Tað einasta formliga krav, ið sett verður til HF-umsøkjaran er, at hann/hon skal hava fylt 18 ár í seinasta lagi 1. februar í tí ári próvtøkan verður tikin. Viðvíkjandi kvalifikatiónum er høvuðsreglan tann, at realprógv ella eitt 1o. floks-prógv geva atgongd. Tó skal 1o. floks-prógvið umframt at hava eina vissa góðsku vera við tveimum fremmandamálum, enskum og týskum; t.v.s. at tey, ið ikki hava 1o. floks-prógv við týskum, mugu útvega sær hendan kunnleika annaðhvørt áðrenn tey koma á skeiðið ella, um til ber, við einum skjótum byrjunarskeiði, sum lagt verður inn í skúlatíðina fyrst í 1. lestrarhálvári. Matematikk krevst á sama stigi sum til tekniskt fyrireikingarprógv.

Men eisini onnur hava atgongd. Fyrr hevur tað verið so, at mangur, ið aftan á lokna

skúlagongd var farin út í vinnulívið, men sum seinni ætlaði at byrja aftur við onkrum øðrum, bókligum, fann vegin til víðari útbúgving stongdan, tí forkunnleikin var ov lítil. Hesum kann HF koma til hjálpar. Nøkur ár úti í vinnulívinum kunnu ofta geva búnaska og evni til sjálvstøðugt arbeiði, sum kunnu vera eins virðismikil fyri HF-útbúgvingina og beinleiðis skúlakunnleiki. Tó verða viss krøv sett um forkunnleika í matematikk, fremmandum málum og fysikk. Í matematikk krevst ein kunnleiki, ið samsvarar tí, ið krevst til tekniskt fyrireikingarprógv ella royndina eftir 2. real. Í enskum og týskum krevst kunnleiki, ið samsvarar tí, ið krevst til 10. floks-royndina ella realprógv, og í fysikk, um ein ynskir hetta sum valgrein, kunnleiki, ið svarar til tað, ið krevst til økt tekniskt fyrireikingarprógv ella realprógv. Hvussu fólk hava útvegað sær hendan kunnleika, mugu tey sjálv standa til svars fyri. Vit krevja ongi serstøk prógv. Tað kundi t.d. hugsast, at onkur hevur verið eini tvey ár í Onglandi, og kann hetta møguliga metast at hava givið nóg mikið av kunnleika í enskum til at uppfylla treytina hesum máli viðvíkjandi at sleppa inn.

## AVGERÐ UM UPPTØKU

Rektarin fyri HF-skeiðið ger av, hvørjir umsøkjarar verða upptiknir. Henda avgerð verður grundað á eina meting av fakligum og persónligum kvalifikatiónum hjá tí einstaka, og tí verða allir umsøkjararnir bidnir um at koma til eina persónliga samrøðu við rektara og lestrarvegleiðarar.

## SJÁLVLESTUR

Skeiðið í Hoydølum er regluligt skeið í øllum lærugreinum. Skeiðini í Klaksvík og Suðuroy eru eisini við regluligari skúlagongd, men í ávísum lærugreinum fer undirvísingin fram við hjálparlærarum úr Hoydølum. Í hesum lærugreinum verður farið til próvtøku í øllum tí lisna.

Tað er eisini møguligt at taka HF sum reint sjálvstudium. Ein kann sjálvur innstilla seg til próvtøku, um ein heldur seg til; tað einasta formliga kravið er, at viðkomandi hevur fylt 18 ár áðrenn 1. februar í próvtøkuárinum. Men hann hevur ikki rætt til sama stuðul í lestrinum, sum veittur verður í Klaksvík og í Suðuroy.

# HF

Í Föroyum er eitt HF-skeið. Hetta skeiðið hevur tríggjar deildir: Eina í Suðuroy, eina í Klakksvík og eina í Hoydölum. Rektarin við Föroya Studentaskúli er rektari á HF-skeiðinum og hevur ta pedagogisku ábyrgdina fyri allar deildirnar. Deildin í Hoydölum er fíggjarliga reint föroysk og verður goldin av Landsstýrinum. Deildirnar á bygd verða fíggjaðar sum fólkaskúlin, soleiðis at staturin skal gjalda 55% og Landsstýrið 45%. T.v.s. at skúlastjórnin hevur nakað at siga viðvíkjandi tí fíggjarliga.

Tann umsitingarliga ábyrgdin í Hoydölum er hjá rektaranum. sum hevur ein umsitingarleiðari til hetta. Í Suðuroy og í Klakksvík er á hvörjum plássi ein umsitingarleiðari sum hevur tað dagligu umsitingina undir sær.

Lestrarvegleiðarar eru á öllum 3 plássum: Ein í Suðuroy, ein í Klakksvík og tveir í Hoydölum. Hesir fýra lestrarvegleiðarar skulu arbeiða nær saman og ábyrgdin fyri samarbeiðinum millum deildirnar hvílir á teimum. Lestrarvegleiðararnir skulu ráðanæmingunum bæði viðvíkjandi fakligum og persónligum spurningum, tey skulu geva teimum "studietektikk" yrkisleiðbeining, hava samröður við fólk. ið melda seg til skeiðið svara uppá fyrispurningar og mangt annað.

Öll trý stöð skulu fólk kunna taka eina fulla HF-próvtöku eftir tveimum árum.

Av tí at har ikki eru kvalifiseraðir lærarar í öllum fakum á bygd, er hendan skipanin gjörd fyri Föroyar:

Í lærugreinum, har kvalifiseraðir lærarar eru eru ongir trupulleikar. Næmingurin endar við eini próvtöku sum kursistur. um hann hevur fylgt undirvísingini fult.

Í hinum greinunum verða settir tveir lærarar ein hjálærari og ein stuðulslærari. Stuðulslærarin, sum er kvalifiseraður, leggur undirvísingina til rættis og útvegar tilfar, t.v.s. at hann ávísir bökur, ljóðbond, ljósbílöt, filmar o.a., og hann ger eina tímaskrá. Hjálærarin undirvísir í öllum pensum men 20% av tíðini skal stuðulslærarin undirvísa. Hesi 20% verða javnt býtt uppá 5 ferðir um árið, har stuðulslærarin kemur og undirvísir, gevur uppgávur, hevur spyrjitíma o.a. Næmingarnar hava mötiskyldu til allar tímarnar bæði hjá hjálærarunum og stuðulslærarunum, og teir hava rætt til at sökja studning.

G.H.

# HF

LV = lestrarvegleiðarar
UL = umsitingarleiðarar
N = næmingar





Teir 4 lestrarvegleiðararnir

JOHNNY THOMSEN (Klakksvík)
HANS JÁKUP DEBES (Hoydalar)
JÓANNES DALSGAARD (Suðuroy)
GUNVØR HOYDAL (Hoydalar)

HF-næmingar í Klakksvík



Aftan á summarfrítíðina í ár er ætlanin at fara undir eina nýggja lærugrein: Fiskivinna, sum valgrein innan fyri HF.



# uppskot til innihald í hf-valgrein **FISKIVINNA**



ENDAMÁL: Endamálið við undirvísingini er, at tey sum velja hesa lærugrein, fáa kunnleika til tey náttúruviðurskifti og tey samfelagsviðurskifti, sum hava týdning fyri høvuðsvinnuna í Føroyum. Við hesi vitan skulu tey vera før fyri kritiskt at vurdera og meta um upplýsingar um tey viðurskifti, sum hava við fiskivinnuna at gera.

UNDIRVÍSINGIN: Undirvísingin viðger fiskin og tey viðurskifti, sum ávirka hann frá hann svimur í havinum til hann fer av landinum sum viðgjørd vøra. Dentur verður lagdur á at greiða frá, hvussu fiskiskapur og viðgerð verða løgd til rættis á skilabestan hátt. Harnæst verða evni innan handil og búskap, og arbeiðsmøguleikar og -viðurskifti hjá tí fólki, sum starvast í vinnuni gjølla viðgjørd.



Tað ber til at leggja dent á serligar partar av hesum evnum, so næmingarnir innan ávís øki kunnu fáa praktiskan kunnleika. Pláss eigur at vera fyri at vinna henda praktiska kunnleika við beinleiðis virki innan vinnuna.

ALMENNAR VIÐMERKINGAR TIL FISKIVINNUTILFARIÐ Í SKÚLANUM.

Vit hugsa okkum, at tað sum hevur við fiskivinnuna at gera, verður viðgjørt á 3 stigum:

1. stig: Í teimum lo fyrstu skúlaárunum má tað haldast at vera rímuligt, at næmingar hava fingið kunning í øllum pør um frá A - F. Somuleiðis kunnu evni úr fiskivinnuni hóskiliga vera evni hjá ymiskum sergreinum.

2. stig: HF (Studentaskúli).
Á hesum stigi verða partarnir frá A - F viðgjørdir me gjølla og sjálvstøðugt, so sum hjálagda uppskot sigur frá. Hetta kann bæði vera við at læra eina sjálvstøðu lærugrein: FISKIVINNA, ella við at evni úr fiskivinnur vera nýtt í sergreinum (matematikk, fysikk, kemi, biologi, samfelagslæru o.s.fr.).

Við hesum verður støðið lagt til serútbúgvingar, sum greitt frá niðanfyri.

3. stig: Yrkislærur av ymsum slag.
Til at røkja ymisk yrki innan fiskivinnuna, er neyðug at bygt verður omaní 2. stig. Henda yrkislæra mugu vi hugsa hendir á sjómansskúlanum ella í samstarvi við te virki og teir stovnar, sum skulu hava fólkið í arbeiði eftir lokna útbúgving.



Vit kunnu nevna hesi dømi, saman við hvørjum parti (A - F) serliga skal byggjast uppá.



PPSKOT TIL SKEIÐ Í FISKIVINNU.



| nnihald: | Tilfar frá: |
|---|---|
| . Náttúrugrundarlagið. | |
| 1. Hvar veiða vit fiskin? | Fiskirannsóknarstovuni |
| 2. Hvørji sløg veiða vit? | Hagdeildini |
| 3. Hvørjar nøgdir veiða vit? | |
| . Hvussu veiða vit fiskin? | |
| 1. Reiðskapur og skip. | Fiskirannsóknarstovuni |
| 2. Effektiviteturin hjá ymiskum reiðskapi. | Fiskiflotanum |
| . Hvussu fáa vit mest burtur úr sjónum? | |
| 1. Skilagott og tápuligt fiskarí. | Fiskirannsóknarstovuni |
| 2. Framleiðslumøguleikarnir í havinum. | |
| 3. Fiskaaling. | |
| . Hvussu verður veiðan viðgjørd? | |
| 1. Fiskur sum rávøra. | Evna- og Bakt.fr. starvsstovuni (Fiskiídnaðarstovuni) |
| 2. Framleiðslan. | |
| . Hvussu sleppa vit av við fiskin? | |
| 1. Marknaðarviðurskifti. | Fiskasøluni |
| 2. Søluskipanin. | |
| . Fiskivinnan. | |
| 1. Kor fiskimanna og skipan teirra. | Føroya Fiskimannafelag |
| 2. Fíggjarligu úrslitini í fiskivinnuni. | Búskaparráðið |
| 3. Fíggjan av virki uppi á landi og á sjónum. | |
| 4. Yrkisleiðbeining innan fiskivinnuna. | |



etta eru høvuðsheitini í einum tílíkum skeiði. Alt eftir hvat menn vilja leggja ent á, ber til at tamba ein ávísan part og kenna ógvuliga nágreiniliga í honum. artil er hugsanin, at so stórur partur av undirvísingini skal fyriganga undir raktiskum viðurskiftum, á starvsstovum, virkjum og evt. skipum.

Viðmerkingar til konkreta uppskotið til skeiðið.

## A. NÁTTÚRUGRUNDARLAGIÐ.



### 1. Hvar veiða vit fiskin?

Yvirlit yvir týdningarmestu leiðir, føroyingar royna.
Botnur, veðurlag og streymur og onnur fysisk viðurskifti, sum hava týdning fyri fiskiskapin.
Hví savnast fiskurin serliga á ávísum økjum til ávísar tíðir?
Almenn havfrøði og streymlæra.
(Størsti dentur verður lagdur á leiðirnar undir Føroyum.

FYSIKK, GEOGRAFI og HAGFRØÐI.

### 2. Hvørji sløg veiða vit?



Alment um djórabólkin og lívfrøði teirra.
Høvuðsdrøgini í teimum stovnum, føroyingar troyta.
Stovnarnir og gongdir teirra.
Støðan í stovnunum.
(Stovnarnir undir Føroyum meira gjølla.)



LÍVFRØÐI, HAGFRØÐI og GEOGRAFI.

### 3. Hvørjar nøgdir veiða vit?

Heildarveiðan í ymsu stovnunum og partur føroyinga.

HAGFRØÐI, GEOGRAFI.





## B. HVUSSU VEIÐA VIT FISKIN?

### 1. Reiðskapur og skip.

Føroysk skipasløg og útgerð teirra.
Reiðskapssøg alment.
Staðfestingartól: Radar, loran, decca, radiovitar.
Leitingartól: Ekkolodd, asdikk, sondir o.s.fr.

### 2. Effektiviteturin hjá ymiskum reiðskapi.

Manningarkrøv og krøv til skipini.



TEKNIKKUR, FYSIKK og KEMI.

## C. HVUSSU FÁA VIT MEST BURTUR ÚR SJÓNUM?



Skilagóður og tápuligur fiskiskapur.
Optimalur og eunetriskur fiskiskapur.
Framleiðslumøguleikarnir í sjónum.
Føðiketur og økologi.
Fiskaaling.

LÍVFRØÐI og MATEMATIKK.



D. Hvussu verður veiðan viðgjörd?

Hvat hendir, tá fiskurin doyr?
Autolysa og bakteriuálop.
Hvörjir parametrar hava týdning fyri góða rávöru?
Viðgerð umborð, viðgerð á landi.
Framleiðslan av vöruni, matfiskur.
Framleiðslan av vöruni, ídnaðarfiskur.

LÍVFRÖÐI, KEMI, FYSIKK OG TEKNIKKUR.

E. Hvussu sleppa vit av við fiskin?

Fyrsta liðið. (Ráfiskanevndin, saltfiskanevndin onnur prísáseting og góðsking).
Útflutningurin.
Marknaðarviðurskifti og faktorar, sum hava týdning fyri tey.
Skipanin av söluni í útlondum og hövuðsmarknaðir.

UMSITING, BÚSKAPUR OG HAGFRÖÐI.

F. Tey, sum starvast í fiskivinnuni.

Fiskimenninir, og hvussu teir skipa seg.
Fíggjarlig úrslit og sáttmálar.
Fíggjan av skipum og virkjum uppi á landi.

YRKISLEIÐBEINING Í FISKIVINNUNI.







DÖMI UM SERLÆRUR, HAR FISKIVINNUTILFAR FER INN SUM PARTUR:

| | |
|---|---|
| Sjómanslæra | Serliga A-B-C-D-F |
| Yvirmenn á fiskiskipum | Serliga A-B-C-D |
| Eftirlitsmenn í fiskivinnuni | Serliga C-D-E |
| Teknikkarar á fiskivirkjum | Serliga D-E |
| Starvstovufólk | Serliga C-D-E |
| Biologassistentar | Serliga A-B-C |
| Fiskaalarar | Serliga A-C-D-E |
| Fiskivinnuumsiting | Serliga A-B-C-D-E-F |



GH

# KOSTDEILDIN

Innivist fáa HF- og studentanæmingar. Tað eru serliga tær fíggjarligu umstöðurnar hjá foreldrunum, sum eru avgerandi fyri upptökuna. Innivist fæst bert fyri eitt skúlaár í senn. og má sökjast av nýggjum á hvörjum ári. Næmingar í 1g og 1HF hava framíhjárætt.

Næmingur, sum er upptikin, kann einans sigast upp 2 ferðir um árið: til jólar og annars til skúlaárslok. Næmingur, ið ikki stendur uppflytingarroynd, kann ikki verða búgvandi, uttan so at pláss er eftir, tá ið nýggir umsökjarar eru tiknir inn. Kostdeildin letur seingjartoy og handklöð ókeypis og letur tey vaska. Handklöð, sum verða nýtt í samband við fimleik á skúlanum og í svimjihylinum, má næmingurin sjálvur keypa sær.

Kostnæmingur skal gjalda 3.9oo kr. fyri alt skúlaárið, og verður goldið mánaðarliga frammanundan 390 kr., fyrstu ferð tann 20. aug. og seinastu ferð 20. mai.

Avtala er gjörd við Havnar Sjúkrakassa, at allir næmingar hava Andor Ellefsen sum lækna.

Ein vanligur skúladagur hjá kostnæmingunum er skipaður soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| kl. 7.15 | | farið verður upp |
| - 7.30 | | morgunmatur |
| - 7.45 | | verður matstovan læst |
| - 7.50 | - 12.15 | 5 skúlatímar |
| - 12.15 | - 12.55 | dögurði |
| - 12.55 | - 14.35 | 3 skúlatímar |
| - 14.35 | | drekka |
| - 16.00 | - 17.30 | lesifriður |
| - 18.00 | - 18.30 | nátturði |
| - 19.00 | - 20.30 | lesifriður |
| - 20.30 | | kvölddrekka |
| - 23.00 | | náttarfriður |

Leygarkvöld verður útiloyvi givið soleiðis:
Næmingar undir 18 ár til kl. 01.00. Næmingar úr 3g og teir, sum eru eldri, eru ikki bundnir av nakrari reglu um útiloyvi Útiloyvi verður givið út um vanligt mark í hvörjum einstökum föri í samráð við kostlæraran.

Kostdeildin er stongd í hesum frítíðum:
Heystfrí
Jólafrí
Páskafrí
Hvítusunnufrí
Summarfrí
og um frídagar falla fríggjadagar-leygardagar og leygardagmánadagar.

## NAKRAR REGLUR INNANDURA

Kostnæmingur skal altíð skifta úr gonguskóm og tuflum í inniskógvar, áðrenn hann fer inn í kamarið ella stovuna.

Áðrenn næmingurin fer í skúla um morgunin, skal hann rudda so mikið upp, at reingerðarkonan væl sleppur at vaska og turka dust av. Bøkur og pappír skulu setast í bókhyllarnar.

Í tíðini kl. 8 - 9 gerandisdagar eiga næmingarnir so vítt gjørligt ikki at ganga inn á stovur, gongir og kømur, so at reingerðarkonan kann fáa arbeiðisfrið.

Tað er forboðið at taka óviðkomandi skúlanæming við inn í hesum tíðarskeiði. Annars hava skúlanæmingar, sum ikki búgva á kostdeildini, onga atgongd til kostdeildina í skúlatíðini.

Seingjarklæðini skulu leggjast í skuffuna, áðrenn næmingurin fer í skúla. Tá næmingurin leggur seg um dagin, skal hann nýta teppini, ikki seingjarklæðini.

Tá næmingurin fer úr kamarinum, eigur hann at ansa eftir, at skápið er læst, so ongin óviðkomandi fær atgongd.

Radio, grammofon, bandupptakari og musikktól eru loyvd at nýta á kømrunum , men tey mugu altíð doyvast so mikið niður, at ljóðið ikki er til ampa fyri onnur. Í lesitíðini mugu hesi tól ikki nýtast, ei heldur aftaná kl. 22.00

Kostnæmingum verður loyvt at prýða veggirnar við myndum innan fyri rímuligt mark. Klistur má ikki nýtast til at festa myndir upp á tapeseraðar veggir. Her kunnu teknistiftir verða nýttar.

Kortspæl verður loyvt í stovuni. Tó má ikki spælast í lesitíðini. Tað er forboðið at spæla um pengar.

Rúsdrekka og sterkt øl má hvørki goymast ella skeinkjast á kostdeildini. Næmingur, ið brýtur hesa reglu, verður burturvístur beinavegin.

Royking er einans loyvd á felagsstovuni vegna eldsvanda.

## NAKRAR REGLUR UTTANDURA

Kostnæmingarnir sleppa at nýta bóltvøllin við Hoydalsá, tó ikki sunnu- og halgidagar millum kl. 11 og 1.

Næmingarnir sleppa at nýta fimleikarhøll skúlans og skúlabókasavnið eftir reglum sum rektarin og skúlabókavørðurin áseta.

Kostnæmingarnir eiga at vísa høviskan atburð móti starvsfólki og lærarum.

Næmingur, ið brýtur omanfyristandandi reglur, fær í fyrstu syftu eina ávaring, í aðru syftu verður hann vanliga burturvístur av kostdeildini.

# INTRODUKTIÓNS-SKEIÐ

Á sama hátt sum seinasta ár byrjaði skúlin aftan á summarfrítíðina við einum introduktiónsskeiði fyri teimum nýggju næmingunum í 1g. Teir vóru bidnir at möta kl. 9 mánadagin 19. aug., og tey samlaðust öll í samkomuhöllini. Rektarin helt fyrst eina röðu fyri teimum, og aftaná helt formaðurin í næmingafelagnum, Helena Dam, eina röðu vegna næmingarnar á skúlanum.

Tá hetta var liðugt, og floksstovurnar ávístar, fóru næmingarnir upp í stovurnar. Tveir lærarar fóru við hvörjum av teimum fýra 1g flokkunum, og annar av teimum var flokslærarin. Hesir báðir lærarar skuldu so fylgja flokkinum teir tveir fyrstu dagarnar.

Tímaskrá við eini flatmynd av skúlanum varð býtt út, og teir ymisku lærararnir komu inn og boðaðu frá, hvörjar bökur, ið næmingarnir skuldu nýta.

So vóru teir vístir runt á skúlanum, og her hövdu tær ymisku serstovurnar áhuga.

Í kantinuni var so aftaná frágreiðing um greinvalið í student deildini og herundir eisini frágreiðing um val millum franskt og rus iskt. 12 næmingar valdu russiskt í staðin fyri franskt.

Aftan á döguröa sum kostdeildin bjóðaði. fóru næmingarnir aftur upp í skúlastovurnar saman við lærarunum og til kl. 14 hövdu teir so "kommunikatiónsroyndir".

Næsta dag, týsdag 20. aug. möttu 2 og 3g og realflokkarnir, 1g helt áfram við introduktiónsskeiðinum. Tey gjördu ymiskar royndir um kommunikatión og endaðu við einum orðaskifti um tað, tey hövdu fingið burtur úr royndunum. Eisini varð § 25 viðgjörd, harí tað stendur, at næmingarnir hava rætt til at vera við at leggja undirvísingina til rættis, og at teir sku góðkenna undirvísingarskránna hjá lærarunum.

Kl. 15 endaði hetta introduktiónsskeiðið, og vanligur skúlagangur byrjaði næsta dag.

Lærararnir, ið vóru við: Inger Jörgensen, Jákup í Gerðinum, Claus Reistrup, Hans J. Debes, Eyðun Sörensen og Jette Hoyda





# TÓNLEIKUR



Her uppi í Hoydölum hevur verið ein nokk so stórur aktivitetur innan fyri tónleikin hetta seinasta árið. Umframt ymiskt privat tónleikavirksemi hjá næmingunum vórðu sett á stovn eitt spælimansorkestur, eitt jazzorkestur og eitt hornorkestur.

Spælimansorkestrið og Elin Johannesen fingu í lag eitt skeið í gomlum fólkadansum. Áhugin fyri at dansa fólkadans vísti seg at vera heilt stórur, og dansað hevur verið næstan hvönn mánadag meginpartin av skúlaárinum.

Fyri kórsangi hevur áhugin tó verið lítil. Lýst hevur verið eftir fólki til kórið í heilum, men kortini hava vit bert havt eitt heilt lítið kór.

Fleiri hava havt áhuga fyri at gera eitt klassiskt orkestur av sama slagi, sum vit hövdu í fjör, men hetta kom ongantíð í lag.

Í farna skúlaári varð skipað fyri einum lesiringi. Her granskaðu nakrir næmingar saman við Kristiani Black tónleik, sum var gjördur um aldarmótið.

Á jólum var eitt undirhaldskvöld í Hoydölum við sjónleiki og tónleiki. Kórið undir leiðslu av Eyðuni Sörensen sang, spælimans- og jazzorkestrið spældu nökur lög, nakrir næmingar sungu tvær vísur um skúlan, Kristian Black og Óli Breckmann sungu nakrar sangir úr Gluntarne av Gunnar Vennerberg, og Bjarni Restorff spældi afturvið. Aftaná var kaffi og wienarbreyð at fáa. Undirhaldskvöldið varð seinni tikið uppaftur fyri almenninginum. Farið varð eisini til Kollafjarðar og Fuglafjarðar við hesum undirhaldi.

Mikudagin 23. apríl kl. 20 varð hildin ein skúlakoncert. Koncertin vardi í góðar 2 tímar. Tað er stuttligt at síggja, at ein so stór koncert kann fáast í lag burtur úr teimum relativt fáu næmingum og lærarum, sum eru á skúla okkara. Skráin, sum spenti heilt frá barokkmusikki til jazz, sá soleiðis út:
Eyðun Sörensen og Kristian Black spældu saman á flygli March Militaire av Schubert. Kórið undir leiðslu av Eyðuni Sörensen sang tríggjar sangir, ein menuett frá baroktíðini varð spæld av Mariusi Dam upp á violin og Bjarna Restorff upp á klaver. Síðani kom eitt barokkstykki, har Sjúrður Olsen spældi blokkfloytu, Kári Sörensen cello og Bjarni klaver. 2b undir leiðslu av Erik Petersen sang 3 sangir. Síðani kom ein sonata í E-mol av Corelli, violin: Erik Petersen, klaver í fyrsta og öðrum satsi: Petur Birgir Petersen, klaver í triðja og fjórða satsi: Bjarni Restorff. So var felagssangur. Aftaná sungu og spældu Óli Breckmann og Levi Hentze tveir sangir, og kórið sang tveir undir leiðslu av Kristinai Black. Steðgur. Aftan á steðgin - jazzorkestrið. Christian Holm Jacobsen sang og spældi ein sang, síðani varð spælt eitt spælimanslag (plystrevise), guitar: Christian Holm, blokkfloyta: Petur Birgir. Petur Birgir spældi ein vals í E-moll av Chopin upp á klaver. Kórið við Eyðuni sum leiðara sang 3 sangir, spælimansorkestrið spældi, og til seinast varð flaggsangurin sungin.

Petur Birgir Petersen



# SPÆLIMENNINIR



Ein dagin fyrst í septembermánað kom ein pappírslepi upp at hanga á uppslagstalvuni. Á honum stóð nakað soleiðis:

> Øll tey, ið duga at spæla upp á eitt ella annað, og sum hava áhuga fyri at koma at spæla í einum orkestri, biðast siga Kristian Black frá.

Hetta var so stoyturin til "Spælimenninar". 5 meldaðu seg:

Christian Holm 2.y guitar, Petur Birgir Petersen 2.y harmoniku, Asbjörn Ström 1.y harmoniku, Bjarni Restorff 2.y kontrabass og Sjúrður Olsen 2.y blokkfloytu.

Kristian Black spældi klaver. Sjúður sá at blokkfloytan ikki hóskaði so væl saman við hinum, og tók seg tí úr aftur.

Hinir byrjaðu so at venjaregluliga aftaná skúlatíð 1-2 ferðir um vikuna. Teir sluppu at royna seg til skúlaveitsluna tann 27. september, men lítið kom burtur úr. Ein útskifting var seinni á árinum. Tað var Bjarni, ið ikki helt seg hava tíð ið fór. Í staðin kom Magnus Hansen 2.x. Nú hövdu "Spælimenninir", sum teir kallaðust, spælt so leingi, at skil för at koma í. 24. januar var farið til Kollafjarðar við "Sjónleiki og Tónleiki". Aftan á framförsluna spældu "Spælimenninir" til almennan dans fyri fyrstu ferð. Tveir nýggjir spælimenn vóru komnir afturat. Tað vóru Hans Ole Larsen, lærari, violin, og Thorkild Rose, lærari, klarinett. Síðani hava teir verið runt um í Föroyum og spælt, og teir eru væl fagnaðir har teir koma.

Christian Holm,Petur Birgir og Magnus søgdu seg ikki at hava tíð til at ferðast runt um í bygdunum og spæla. Teir fóru, og í staðin fyri Magnus,kom ein annar Magnus, nevniliga Magnus Pauli Poulsen,í vanligari talu nevndur Maggi.

Eftir eru so nú:Kristjan Black,Torkild Rose,Hans Ole Larsen,Maggi og Ásbjørn.

15. og 30. apríl høvdu teir eitt sokallað spælimannskvøld uppi á skúlanum.Hetta var sera væleydnað.Tað hava vit ivaleyst Elin Johannesen at takka fyri,tí gjøgnum nærum alt árið hevði hon havt dansiskeið á skúlanum.

Kristjan Black,Hans Ole og Thorkild fara í juli,so ivasamt er,um nakað spælimannsorkestur verður næsta ár.Ein kann bert vóna,at onkur millum teir komandi næmingarnar er ein klarinetblásari,fíólkínari ella klaverboksari.

Ásbjørn Strøm.

Torkild Rose og
Kristjan Black.





Christian Holm
og Ásbjørn Strøm.

# FRÍGGJARARNIR

At enda fall tjaldið fyri,salurin er sum eitt eldkar av lógvabrestum og fagnaðarrópum;tjaldið fer frá aftur og luttakararnir fara fram og bukka,og fjøldin heldur á við at fagna hesum listafólkum,og so,tá tey endiliga sleppa......

Men hvussu byrjaði alt hetta, hvussu nógvar tímar høvdu vit ikki nýtt til henda leik,ið bert vardi ein tíma(knappan)

Alt byrjaði við einari hugnaligari samkomu við kaffi,te og pannukøkum,har var ein rúgva av fólki til staðar,men tá ið pannukøkurnar vóru etnar,og vit skuldu fara at tosa um leikin,minkaði mongdin til 9 fólk +leikstjóran Linu Larsen.

Venjing og leiktjaldsarbeiði gekk so sum so,men at enda náddu vit so á mál,haraftrat komu nakrir lærarar og næmingar við í truppin við sangi og tónleiki,sangkór skúlans luttók tvær ferðir.

Frumframførslan var væleydnað bæði viðvíkjandi leikinum og áskoðarunum,og Ásmund setti eisini sín dám á kvøldið.Eftir hesa góðu løtu vórðu áskoðarnir bodnir til drekka og jólabollar.

Tað var eitt fittligt knoss at ríva kulissurnar niður,blak tær í ein vøruvogn og so út á statshospitalið.Kulissufólkini fingu onga hjálp frá hinum fólkunum,men sum danska orðatakið sigur:"Jens Lyn klarer alt"

Framførslan gekk væl,og eftir sýningina vóru vit boðin til drekka, har Árni Olsen flutti fram takkarrøðu.

Farið varð eisini til Kollafjarðar,har vit høvdu ein góðan mann at fyrireika alt,so tað bert var at koma og fara.Bæði framsýning og dansur gingu væl.

Seinasta sýning var í Fuglafirði,har alt var eitt kaos,men við nógvari og góðari lokalari hjálp gekk tað gott.Morgunin eftir fingu vit svimjihylin ókeypis til láns í ein tíma.

Sjálvt um tað var strævið,fingu vit nógvar hugnaligar løtu:

Rógvi Johansen. Jan Nielsen.



tríggir leikarar úr sjónleikinum "Fríggjararnir"

# SKÚLAÍTRÓTTARDAGURIN

9.apríl var skúlaítróttardagur í ítróttarhøllini fyri næmingar her á skúlanum og børn frá skúlanum í Hoyvík. Byrjað varð tíðliga um morgunin við, at Lydia Arge hevði felagsgymnastikk við teimum næmingum, sum vildu vera við. Síðan varð hildið á til middags við hondbólti, fótbólti, gymnastikkserium, og so felagsgymnastikk einaferð aftrat. kl.12 fingu allir næmingarnir døgurða úti í forhøllini, har borð við eingangsbestikkum vóru uppsett. Lagið var gott, meðan fólk gingu og royndu at fáa fatur á milliónbúff og eplamos og ymer omaná.
Síðan gekk tað slag í slag við hond- og fótbóltskappingini, seriur vórðu vístar, so var stafettrenning millum gentur og dreingir (næmingar) og millum næmingar og lærarar. Togtogan var eisini millum tveir flokkar, og dansiframsyning, meðan Spælimannsorkestrið spældi.
Nógvar stuttligar løtur vóru, sum til dømis tá lærararnir høvdu bjóða Molekylinum úr Hoyvík (smádreingir) av til fótbóltsdyst og Molekylini vunnu.

Sonja



Togtogan millum 2.a (til vinstru) og 2.b.





Liðið ,sum hevur gingið til dans
skúlanum í vetur,hevur dansiuppv
Spælimannsorkestrið spælur.

Frá stafetrenningini ímillum
lærarar og næmingar.Frá vins-
tru:Klaus,Kristjan og Henning.



**Teir vunnu volleybólts-FM í meistaradeildini í Klaksvík næstseinasta viku**

# EKSKURSIÓNIR

Nakrir klassar hava verið ekskursiónir við Katrin Thomassen. Túrurin gekk við bussi frá Húsareyni og endaði norðan fyri Hósvík. Tá H.F. flokkarnir vóru túr, var veðrið gott, og sólin skein. Afturímóti var veðrið av tí ringasta, tá studentanæmingarnir fóru. Út á dagin blíðkaði tó. Sum tað sæst á bílötunum, kannaðu tey syllar og fláir, U-dalar og tílíkt.



s, $3ab^n$, $3\ xy^s$ og $2\ xy^f$
n við Katrin



H.F. flokkarnir sóla sær



# SKOTLANDSTÚRURIN



3.S var ein túr í Skotlandi við Zakarias Wang og Óla Breckmann í heystferiuni 12 - 18 oktober. Tey vóru í Inverness, og haðani fóru tey útferðir til oljuboripallar og annað. Tey vitjaðu eisini Isle of Sky, Dingwall og Niggbay, og steðgaðu ein dag í Kirkwall á veg heimaftur.
Tey høvdu samrøður við Skotska Nationalistiska Flokkin, Tað Geliska Felagið og KIDB um fiskiskap, oljuútvikling og ferðamannalíkindi.
Ferðin varð stuðlað av ymsum virkjum og stovnum, og sjálvi rindaðu tey kr.300 í part.
Heimafturkomin gjørdu tey speciali í samfelagsfaki. Hetta var eitt felags speciali um oljuútvikling og tílíkt.







# Kanningarferd við SVABO



ðuúrslit eystan fyri Nólsoynna

Í mei mánað var 3.g saman við Kjartan Hoydal ein túr við Jens Christian Svabo eystanfyri Nólsoynna. Meiningin við hesum tiltaki er, at næmingarnir skulu fáa eitt yvirlit yvir, hvussu fiskiskapurin gongur fyri seg á landleiðini.





Trolið kemur á borðið.





Tey bíðja eftir at hála verður

# 7. mai

7.mai var seinasti skúladagur hjá næmingunum í 3.g. Sum vera man,er hesin dagur ikki heilt sum teir vanligu skúladagarnir.Og so var eisini í ár.

Tað fyrsta var,at lærarnir vóru koyrdir niðan til skúlan einum lastbili,sum "i dagens anledning" hevði fingið navnið Bukkubilurin.Tá næmingarnir komu niðan í skúlan,var fyrst sungið og dansað niðri í gongini,síðani fóru allir upp á ovastu hædd at fáa sodavatn og wienarbreyð,og sótu har og sungu allir teir traditionellu sangirnar.
Seinni fingu 3.g'ararnir morgunmat saman við lærarunum inni í matarhøllini. Restin av degnum var frídagur.



Næmingarnir dansa í gongini.



Ásbjørn s





BUKKUBILURIN.



3.g'arnir fyrireika
síðsta skúladag .





Cyklan
hjá
Kristjan Black
endaði uppi í
flaggstongini.



# BLÓÐTYPUKANNING

Sum ein part av undirvísingini í biologi hava næmingar seinastu 3 árin kannað blóðtypur sínar innan ABO- og Rhesusskipanina. Tilsamans eru 281 næmingar kannaðir úr hesum flokkum:

1972/73: 3n, 3x, 3y, 3ra og 3rb

1973/74: 3n, 3x, 3y, 3ra og 3rb

1974/75: 3a, 3b, 3xyN, 2xyN, 1p, 1q og 3r

Eftir ABO- skipanini kunnu fólk hava eina av 4 blóðtypum: A, B, AB ella O (nul). Eisini kunnu fólk vera Rhesus positiv ella Rhesus negativ.

Sum kunnugt eru ymiskar orsökir til, at blóðtypurnar verða kannaðar. Tá blóðtransfusjónir skulu gerast, er tað neyðugt at vita blóðtypuna, bæði hjá tí skal hava blóð og tí sum letur
bæði hjá tí sum skal hava blóð, og hjá tí sum letur. Eisini í faðirskap sakum, verða blóðtypurnar kannaðar.

Blóðtypurnar verða kannaðar við at 4 dropar av blóði verða koyrdar niður á eitt sokallað "Eldon kort", sum kann keypast frá "Insulin-laboratoriunum" í Keypmannahavn.




Ein áhugaverd avleiðing av blóðtypukanningum er, at vitan kann fáast um upprunan hjá teimum ymisku fólkaslögunum og tjóðunum. Blóðtypurnar arvast frá foreldrum til börn eftir ógvuliga föstum reglum. Í mun til nógvar aðrar arvaeginleikar ávirkast blóðtypurnar ikki av umhvörvinum.

Ein góð lýsing av hesum fæst úr bókini "Arv og race hos mennesket" efti Ove Frydenberg og J.V.Spärck (1963), sum her skal verða endurgivið eitt brot av :

"ISLÆNDERES HERKOMST". Et eksempel på, at et historisk spørgsmål kan belyses ved betragtning af blodtyperne, er spørgsmålet om de nutidige islænderes herkomst. På grundlag af sagaberetningerne antages det almindeligvis, at den islandske befolkning nedstammer fra vikinger, der koloniserede landet efter at være udvandret fra Skandinavien i tidlig middelalder. At dømme efter visse vidnesbyrd fra nogle af de ældre krøniker (som f.eks. Ari Frodes Islandigabok, ca. 113o) kan der rejses tvivl om, hvorvidt islændernes oprindelse skal søges alene i Skandinavien.

Dels synes der at have været irske kolonisatorer på Island allerede før de skandinaviske landnamsmænd ankom i 9. - 10. århundrede, dels kom Nordmændene ikke altid direkte fra Norge, men ofte fra nybygder på de britiske øer, og har øjensynlig medbragt store antal af keltiske trælle.

Betragter man ABO-blodtypernes fordeling, fremgår det, at islændernes blodtypehyppigheder er stærkt afvigende fra de i Vestskandinavien forekommende, medens der er en iøjnefaldende overensstemmelse med blodtypehyppighederne i Irland (og forøvrigt i Skotland og Wales), der er karakteristisk især ved den meget høje procent af type O.

Denne uoverensstemmelse mellem den islandske og de skandinaviske befolkninger i genetisk konstitution støtter således den antagelse, at der blandt de første kolonisatorer på Island nok var nordboer fra Skandinavien, men at disse kun udgjorde en ganske lille del af befolkningen, nemlig den herskende overklasse. De keltiske trælle, som medførtes, har formodentlig talmæssigt været nordboerne langt overlegne. Man må således antage - endskønt det, som så ofte, blev overklassens kultur, der bestod - at de nutidige islændere rent genealogisk nedstammer fra en befolkning af lignende sammensætning, som den, der findes hos de keltiske befolkninger på de britiske øer.

| TYPA | 1973 | 1974 | 1975 | ÍALT | TALIÐ AV NÆMINGUM |
|---|---|---|---|---|---|
| O | 56,0 % | 65,2 % | 55,8 % | 59,1 % | 166 |
| A | 34,7 % | 23,9 % | 29,2 % | 28,8 % | 81 |
| B | 6,7 % | 7,6 % | 12,5 % | 9,6 % | 27 |
| AB | 2,6 % | 3,3 % | 2,5 % | 2,5 % | 7 |
| Rhesus | | | | | ÍALT 281 |
| + | 88,9 % | 89,1 % | 89,3 % | 88,6 % | 249 |
| ÷ | 11,1 % | 10,9 % | 10,7 % | 11,4 % | 32 |
| | | | | | ÍALT 281 |

| | BLÓÐTYPUBÝTIÐ Í % | | | |
|---|---|---|---|---|
| | A | B | AB | O |
| ÍSLENDINGAR | 32 | 10 | 3 | 55 |
| ÍRARAR | 31 | 12 | 2 | 55 |
| DANSKARAR | 44 | 10 | 4 | 42 |
| NORÐMENN | 49 | 9 | 3 | 39 |
| FØROYINGAR | 29 | 10 | 2 | 59 |

Hyggja vit at talvuni og samanbera kanningarúrslit okkara við tey úr öðrum londum, síggja vit, at prosentbýtið líkist nógv tí íslendska. Eitt rættuliga högt prosenttal fyri O og rættuliga lágt fyri blóðtypu A.Hóast vit vanliga halda mesta ljósið liggur í landsuðri. og mentanarárinið úr Danmark er mest, so tykjast vit í biologiska arvinum meira líkir íslendinum, og hava havt mest samband við bretsku oyggjarnar í eldri tíð.

Gunvör Hoydal

# spesialir í landalæru

2g matematisk deild gjördi - sum vanligt er - speciali í landalæru í ár.

Farið varð so smátt undir fyrireikingar aftan á jól, við ta at vit prátaðu um, hvat evnið skuldi vera. Tórmóður Dahl fr Ídnaðarstovuni kom niðan í einum tíma og greiddi frá, at vi kundu fáa spurnaðarörk frá honum, og meiningin var so tann, at vit skuldu fara runt til öll virkir í Föroyum - Havnin undantikin - við spurnaðarörkunum og útfylla tey. Tá so specialini vóru liðug, skuldi Ídnaðarstovan fáa spurnaðar-örkini aftur, ímóti at teir skuldu gjalda útreiðslurnar til ferðir bil, benzin o.a.t. Her varð serliga hugsað um teir næmingar , sum eru úr Havn, tí innivist skuldi útvegast tei um á tí staðnum, teir hövdu valt. Hinir næmingarnir fóru so vítt gjörligt til heimstaðin.

Vit byrjaðu ein mánamorgun og vóru liðug mikukvöldið. Um-framt at útfylla spurnaðarörkini fyri hvört einstakt virki, skuldu vit eisini leggja til merkis, hvussu havnarökið var, um bygdin var brimpláss, í hvörjum standi vegirnir vóru, hvussu handlarnir vóru, um nógvir nýbygningar vóru og ymist annað, hvat bygdunum viðvíktu.

Alt hetta skuldi avhendast til Katrin Thomassen, landalæru-lærarinnu, tá vit komu aftur til Havnar, saman við eini bygdalýsing og einum korti av hvörji einstakari bygd (undan tikið tær bygdir, har einki virki var.)

Men alt hetta var bara fyrireikingararbeiði. Nústaðni kundu vit fara undir sjálvt specialið. Har valdu næmingarnir sjál ir tað evnið, teir vildu viðgera, soleiðis at onkur kom at arbeiða einsamallur, meðan onnur vóru tvey ella trý.

Evnini vóru ymisk: Ein lýsing av eini bygd, kanna framtíðar möguleikarnar, centralisering og decentralisering, vegasam-band, inn- og útflutningur, servicufunktiónir, rentabili-tetur, arbeiðslönir o.a.

Tað var nokkso flókjasligt at arbeiða í tímunum, tí öll mól um hvönnannan og rótaðu runt við tí sama tilfarinum, av tí at bert eitt eintak var av hvörjum, men specialini vórðu so latin inn einar tveir mánaðar aftaná, at vit vóru farin und at arbeiða við teimum.

Hvussu úrslitini verða,kann einki sigast um enn, men nógv arbeiði varð lagt í fyri at fáa tey so góð sum möguligt.

Sonja Sörensen

Frá studentaskúlanæmingunum Elin Henriksen og Herman Oskarsson í Havn, sum ikki fingu prógv, av tí at tey ikki vildu tosa danskt við próvtøkuna í samfelagslæru, einastu lærugrein, har próvdómarin ikki skilti føroyskt, hava vit fingið hesa frágreiðing sendandi:

# FRÁGREIÐING UM MÁLSPURNINGIN Á FØROYA STUDENTASKÚLA

Føroya Studentaskúli er undir myndugleikanum hjá Direktoratet for Gymnasieskolerne og HF. Hetta førir við sær, at teir próvdómarar, ið eru komnir higar á hvørjum ári síðan 1939, eins og á donskum studentaskúlum hava verið danir, ið ikki skilja føroyskt. Næmingarnir hava tí verið noyddir at tosa danskt.

Seinastu árini hevur misnøgdin yvir hetta verið størri og størri, og í ár hava næmingarnir so avgjørt at gera nakað við tað.

Tíðliga um heystið 1973 samtyktu bæði næmingafelagið og lærararáðið at royna at fáa próvdómarar, ið skilja føroyskt til próvtøkuna í 1974.

Í oktobur var ein umboðsmaður fyri direktoratið her uppi. Tá var spurningurin um at fáa føroyskar próvdómarar viðgjørdur í lærararáðnum. Lærararáðið vísti á fleiri møguleikar at loysa spurningin.

Av tí, at einki meir spurdist burturúr, sendu næmingarnir í 3. g. tann 23/1-74 bræv til rektaran, har vit sýttu fyri at málbera okkum á donskum til próvtøkuna.

Rektarin sendi brævið niður til direktoratið.

Í svarinum frá direktoratinum 8/2 varð sagt, at direktoratið fegið vildi latið okkum tosað føroyskt, um tað hevði verið nóg mikið av próvdómarum, ið tosa føroyskt, at næmingarnir ikki fáa prógv, um vit ikki tosa danskt.

18/2 høvdu næmingarnir í 3.g. fund um málið. Fundurin samtykti at vísa aftur grundgevingini frá direktoratinum um, at tað ikki finnast kvalificeraðir próvdómarar, ið skilja føroyskt. Direktoratið kundi ikki hava kannað spurningin nóg gjølla, tí vit vita, at slíkir finnast. Harnæst avgjørdu vit at standa fast við, at vit til próvtøkuna tosa føroyskt.

Samstarvsnevndin (nevnd, ið virkar sum samanbindandi lið millum lærararáðið og næmingafelagið) orðaði eitt bræv til landsstýrið. Har varð skotið upp sum fyribils loysn av hesum máli, at landsstýrið sum skjótast vendir sær til avvarðandi politisku myndugleikar í Danmark við áheitan um, at próvdómarar til próvtøkuna í summar verða útnevndir eftir einum lista, sum rekarin hevur gjørt yvir kvalificeraðar próvdómarar, ið skilja føroyskt.

Tann 21/2 varð brævið, undirskrivað av lærararáðnum, næmingafelagnum og rektaranum givið Asbjørn Joensen, samstundis sum vit høvdu ein fund við hann.

Umleið 20/4 kom svar frá direktoratinum, at teir høvdu funnið próvdómarar til allar lærugreinir uttan tvær.

23/4 høvdu næmingarnir í 3.g. fund um hetta svar, og avgjørt varð, at vit framvegis ætla at tosa føroyskt í øllum lærugreinum. Hetta varð kunngjørt rektaranum.

8/5 fingu vit at vita, at hesar

báðar lærugreinirnar vóru søga og samfelagslæra.

Tann 22/5 høvdu næmingarnir fund við Richard Frederiksen, undirvísingarstjóra. Hann royndi at fáa okkum at tosa danskt í hesum báðum lærugreinum, meðan næmingarnir vístu á fleiri møguleikar fyri at loysa málið soleiðis, at vit kundu tosa føroyskt.

24/5 skrivaði lærararáðið bræv til landsstýrið, har skotið varð upp at seta ein próvdómara, sum skilir føroyskt, í søgu, og at næmingarnir í samfelagslæru kundu tosa føroyskt.

27/5 høvdu næmingarnir í 3.g. fund, har samtykt varð at taka undir við lærararáðnum, og samstundis varð sagt, at vit framvegis ætla at tosa føroyskt.

Seinni fingu vit at vita, at ein próvdómari, sum skilir føroyskt, var settur í søgu; og vit fingu enn einaferð at vita, at tey, sum ikki tosa danskt í samfelagslæru, fingu einki prógv.

Sum tað sæst av frágreiðingini um brævaskiftið og samráðingarnar annars hevur gingið sera striltið at fáa donsku myndugleikarnar at eftirlíka okkum í sjálvsagda rætti okkara at tosa føroyskt til próvtøkuna. Vit hava merkt, at teir kendu tað sum skyldu sína at verja donsku skúlaskipanina í Føroyum. Danska direktoratið hevur Føroya Studentaskúla í sínum hondum.

Vit hava áður nevnt tað, men tað kann nevnast einaferð enn, at gongdin, síðan fyrstu pisurnar í 1939 vórðu klaktar, hevur verið tann, at ein hópur av føroyskt útbúnum studentum hava arbeitt uttanlands, serstakliga í Danmark og á tann hátt veitt hesum londum inntøkur, sum kundu komið landi okkara at gagni, meðan skúlagongd teirra her heima hevur kostað fólkinum ein hóp.

Tað er hesum, vit vilja koma til lívs. Vit meta, at hetta óskil má halda uppat, og tað var við hesum í huga, at vit tosaðu føroyskt til próvtøkuna og tessvegna ikki fingu prógv.

Vit hava ikki fingið nakað lyfti um, at øll próvtøka í framtíðini fer at fara fram á føroyskum. Tvørturímóti, vit hava fingið at vita, at eisini í komandi árum noyðast nakrir næmingar at tosa danskt. Tað er skeivt, at føroyingar skulu noyðast at tosa danskt til próvtøku heima í Føroyum.

Skúlin er danskur og próvtøkan er donsk. Men heimastýrislógin sigur, at «føroyskt verður viðurkent sum høvuðsmálið», og sostatt meta vit, at vit av røttum verða stuðlað av henni. Somuleiðis hevur løgtingið samtykt, at áleggja landsstýrinum «at bera umsorgan fyri, at øll próvtøka á Føroya Studentaskúla nú og í framtíðini fer fram á føroyskum.»

UM tað, hóast henda stuðul og annars stuðul frá fólki og feløgum ikki er okkum loyvt at tosa føroyskt til próvtøku, ja, so hevur hvørki løgtingið ella heimastýrislógin nakra ávirkar, tá danskir myndugleikar seta seg upp ímóti.

Men tað eru føroysku myndugleikarnir, løgting og landsstýri, sum hava ábyrgdina av, at Føroya Studentaskúli er danskur. Tí heita vit einaferð enn á løgting og landsstýri at skipa so fyri, at vit fáa eina føroyska hægri útbúgving í Føroyum.

**Tey, ið ikki fingu prógv**

Elin og Hermann, sum tosaðu föroyskt til próvtökuna í samfelagslæru, fingu, sum kunnugt, einki prógv. Eksaminatiónirnar vorðu tiknar upp á bandi, ið varð varðveit hjá rektarinum. Hetta band varð síðani avskrivað og umsett til danskt av rektarinum og sent niður við kravi frá lærararáðnum, um at eksaminatiónirnar vórðu dömdar, so at hesir báðir næmingarnar fingu prógv. Tá skúlin byrjaði aftur kom svar frá Direktoratinum, at teir ikki, eftir samröðu við Landsstýrið, kundi geva teimum prógv.

10. oktober var fundur í lærararáðnum um málspurningin. Úrslitið av hesum fundi var hetta uppskot sum varð sent Landsstýrinum:

## UPPSKOT FRÁ LÆRARARÁÐNUM Á FØROYA STUDENTASKÚLA UM MÁLSPURNINGIN

Á fundi í lærararáðnum á Føroya Studentaskúla lo. oktober 1974 varð samtykt at senda Føroya Landsstýri hetta skriv:

1) LOYSN Á MÁLSPURNINGINUM.

Lærararáðið á Føroya Studentaskúla heldur, at tað er avgjørt neyðugt, at ein loysn verður funnin í málspurninginum áðrenn próvtøkuna í 1975 bæði fyri HF-skeiðið og studentaskúlan.

Lærararáðið hevur viðgjørt málið gjølla og er komið fram til hesi uppskot:

A: Landsstýrið skipar fyri próvtøkuni, soleiðis at tað millum annað setir censorar. Direktoratið hevur eftirlitið við at "niveau" er á hædd við tí, sum krevst aðrastaðni. Hetta kundi farið fram við eini konsulentskipan.

B: Direktoratið hevur ábyrgdina av, at allir censorar, ið koma henda veg, skilja føroyskt. Um teir ikki eru tøkir, verður við stuttum skeiðum í føroyskum skipað fyri, at teir kunnu meta próvtøkuna, ið fer fram á føroyskum.

Semja var á fundinum um, at A) var besta loysnin.

Í hesum brævi varð eisini sett uppskot fram um, at Landsstýrið antin krevur frá Direktoratinum. at Elin og Hermann fáa prógv ella at Landsstýrið sjálvt útvegur teimum hetta við viðmerking um, at hetta ikki er góðkent av danska direktoratinum.

Næmingarnar tóku undir við hesum uppskotinum.

Hetta er tað seinasta, ið lærararáðið hevur gjört við málspurningin.

Í hesum skúlaárið hevur "málbólkurin" arbeitt við hesum sprurningi. Teir hava havt fundir og samröður við næmingar og politikarar og skrivað í blöðini um spurningin. Eisini settu teir í januar krav fram um, at tær skrivligu uppgávurnar í biologi og samfelagslæru kundi skrivast á föroyskum.

Frágreiðing frá málbólkinum kemur seinni.

# MÁLSPURNINGURIN

Á aðalfundinum hjá næmingafelagnum 19-9 varð uppskot sett fram um at góðkenna ein bólk, sum hevur tikið seg saman um at arbeiða víðari við málspurninginum. Eftir at bólkurin hevði givið eina frágreiðing, um hvussu bólkurin skal arbeiða, hvat hann skal takast við, og hvussu hann skal skipast, varð atkvøtt um málið, og tað varð samtykt. Bólkurin er sostatt góðkendur sum ein arbeiðsbólkur undir næmingafelagnum, og hann skal arbeiða fram ímóti eini loysn av málspurninginum.

Á fundinum legði bólkurin hesa frágreiðing fram:

Tað er fest í Heimastýrislógini, at føroyskt er høvuðsmálið í Føroyum. Henda lóg er higartil ikki sett í verk á Føroya Studentaskúla. Í lógunum fyri studentaskúlar og HF stendur týðiliga og greitt, at próvtøkan skal endurspegla ta dagligu undirvísingina. Á Føroya Studentaskúla verður í høvuðsheitum undirvíst á føroyskum, og sostatt verður ein próvtøka, har næmingarnir verða noyddir at málbera seg á donskum, ikki ein endurspegling av teirri dagligu undirvísingini.

Heldur ikki henda samtykt — gjørd og góðkend av sjálvum Direktoratinum — er sostatt sett í verk á Føroya Studentaskúla.

Harafturat kemur so tann sannroynd, at ein stórur partur av møguleikunum hjá næmingunum til at leggja sína vitan greitt og skilliga fram verður skerdur, tí næmingarnir eru noyddir at málbera seg á einum fremmandum máli.

Alt hetta er tá saman um kemur ein beinleiðis kúgan av okkum sum føroyskum skúlanæmingum — eins og bólkurin tekur til í reglum sínum.

Av hesum orsøkum er bólkurin stovnaður, ið umboðar áhugamálini hjá nógv tí størsta partinum av næmingunum.

Bólkurin er neyðugur fyri at málspurningurin ikki skal detta niðurfyri, men ístaðin verða hildin aktuellur millum n næmingar, lærarar, teir avvarðandi myndugleikarnar, og alt Føroya fólk yvirhøvur.

Bólkurin er neyðugur fyri at nýggjar leiðir kunnu leggjast í stríðnum, fyri at fáa hetta átrokandi og rættvísa krav okkara loyst, áðrenn próvtøkan byrjar aftur næsta ár.

Bólkurin stendur opin, soleiðis, at fólk, sum hava áhuga fyri at arbeiða við málinum, kunnu boða einum av nevndarlimunum frá og síðan á fundi við nevndina koma ásamt um tær arbeiðsuppgávur, viðkomandi skal fremja.

Bólkurin kemur at skipast í fleiri arbeiðsbólkar, sum fáa ymiskar arbeiðsuppgávur at takast við.

Fundur verður hildin regluliga, t. d. eina ferð um vikuna, har nevndin og ein limur úr hvørjum bólki hava skyldu at møta. Á hesum fundum verður avgjørt, hvat gerast skal, og uppgávurnar býttar úr hareftir. Eisini verða fundir, har allir bólkalimirnir møta til tess at gera støðuna upp við pssa andi millumbilum.

Undir uppgávur kemur slíkt sum: Kannan av skjølum, tilfar til Vitan og hini bløðini, prenta flogseðlar, skipa fyri viðtalum við politikkarar og onnur fólk, sum haldast at hava týdning fyri málið á ein ella annan hátt, og ymiskt annað, ið verður aktuelt.

Styðjið tí bólkin beinleiðis!!!

# Bólkurin

Teir, sum hava tikið seg saman um at stovna bólkin, eru Mass 3a, Jógvan 3x, Andrass 3y og Tummas 2a. Bólkurin hevði sín fyrsta fund 9. september, og á hesum stovningarfundi varð tosað um navn á bólkinum, endamál, arbeiðshátt, skipan og iseologiska grundarlag hansara. Gjørt varð eitt uppskot, og fylgjandi varð samtykt:

Navn: Bólkurin til loysn av málspurningipum.

Endamál:
spurninginu
spurningar í
an og sam
yvirhøvur k
beiðsevni b

Arbeiðsh
við politikk
andi fólk, h
ar og onnur
allan skúlar
agsfundunu
politikkaru
fólki. 3) So
ir tað hava
at skipa f



Tummas í Dali
studentaskúlanæmingur

fundum á skúlanum. 4) Útbreiðsla av flogseðlum á skúlanum, og fyri so vítt um alt landið og skipan og leiðan av ymiskum tiltøkum. um bólkurin kemur til ta niðurstøðu, at hansara arbeiði ikki hevur gjørt stórvegis mun ella als onga ávirkan hevur havt fyri fremjanina av endamáli hansara.

Skipan: 1) Bólkurin velur sær ein formann, ið kallar saman til f
reikaða
andlitið
velur se
sum h
arb
und
s g
alei
alig
g m
. 3)
s ei
nin
lesk
v p
m g
kum,
i k
har



Jógvan Jespersen: — Vit víst vælvild

# álstríðið í Hoydølum — meting

Nú skulu vit so aftur, tá ið vit koyra upp fyri Útvarpinum, og tá ið vit fáa bløðini, hoyra og lesa um næmingar í Hoydølum, næmingar, sum vilja og næmingar, sum krevja. Fyrst vildu teir sleppa at tosa føroyskt, og nú vilja teir eisini skriva á føroyskum, og úrslitið er, at teir ikki fáa prógv.

Nú eru óivað nógvar meiningar um hetta sokallaða »málstríðið« á Studentaskúlanum, sum nú hevur verið í skjótt 2 ár. Summi halda lítið um tað, halda tað vera fjas og at fyribrigdi eru í okkara samfelag, ið eru meira neyðug at stríðast fyri. Summi, sum sjálvi hava gingið á skúlanum, skilja kanska heldur ikki rættuliga, hví næmingarnir knappliga eru vorðnir so »nationalir«, meira enn teir vórðu, tí tá ið teir gingu har, bar væl til at tosa og skriva danskt. Summi aftur halda, at næmingarnir hava rætt í teirra krøvum, men at teir ganga ov langt. Eisini halda tey flestu nokk, at onkur einkultur persónur ella lítil bólkur hevursett hetta í verk og halda, at illa stendur til á skúlanum og at einki skil er í.

Hetta skal bert vera ein meting av hesum »málstríði«, og ein heilt persónlig meting, sum ikki á nakran hátt er »officiel« fyri skúlan. Henda meting er, at tað eru umstøðurnar og treytirnar, sum skúlin arbeiðir undir, ið er orsøkin. Hetta sæst fyri tað fyrsta av tí, at bæði næmingar og lærarar eru samd um málið. Har er einki innanhýsis klændur viðvíkjandi hesum, og tað sjálvt um bæði næmingar og serliga lærararnir eru ógvuliga ymiskir í aðra mátar: bæði í aldri, politiskari og religiøsari áskoðan, nationaliteti o.ø. Heldur ikki eru næmingar vorðnir meira nationalir, enn teir altíð hava verið.

So løgið tað ljóðar, so koma trupulleikarnir av, at skúlin uppfyllir tær treytir, sum hann skal eftir fyriskipanini, og at hann eftir hesum riggar væl, og at skilið er gott. Skúlin gongur og hevur altíð gingið eftir einari danskari fyriskipan, og »niveauið« hevur altíð ligið líka høgt, sum á øðrum studentaskúlum í ríkinum, ja, kanska hægri enn á nógvum skúlum í Danmark. Direktoratið hevur tað pedagogiska eftirlitið við skúlanum og hevur óivað gjørt sítt til, at skúlin í Hoydølum hevur verið so góður, í mun til nógvar aðrar skúlar her. Hóast tað, at umstøðurnar ofta hava verið verri, tí tað hevur verið ringari at uppfylla krøvini frá tí danska Direktoratinum heruppi enn í Danmark, hevur skúlin tó klárað at givið sínum næmingum eitt prógv, sum verður góðtikið aðra staðni.

Men nú er tað soleiðis, at samfeløg broytast, og eisini tað danska samfelagið broytist, og tað setur onnur og hægri krøv til útbúgving, og skúlin verður tí eisini broyttur. Innan fyri tey

seinastu árini er skúlin í Danmark nógv broyttur. Sjálvandi broytist tað føroyska samfelagið eisini, men stillar tað nøkur krøv til skúlan? Um so er, eru tað so tey somu krøvini sum í Danmark? Um krøvini ikki eru tey somu, hvørjum skal skúlin so fylgja?

Sum nú er, skal Studentaskúlin fylgja teimum donsku. Hetta ber ikki til longur og her haldi eg, at trupulleikarnir koma. Skúlin er komin út í eina tvístøðu, sum á onkran hátt má loysast. Hetta hevur í fyrstu syftu víst seg í málstríðnum, men goymur nógv annað í sær, sum hevur týdning fyri alt samfelagið, og ikki bert fyri lærarar og næmingar á skúlanum.

Fyrr var skúlin so, at eitt fast pensum skuldi lesast. Hetta lá n nøkurlunda fast um alt ríkið, og tær somu bøkurnar vóru lisnar alla staðni. Onkuntíð kom ein nýggj bók, og so skifti flest øll. Til prógvtøkuna skuldi næmingurin vísa, at hann hevði verið gjøgnum hetta pensum. Lærarin spurdi, næmingurin svaraði og censor hevði eftirlit við, at næmingurin dugdi hetta pensum. Bøkurnar vóru á donskum, og tí var tað kanska í nógvum førum líka lætt at endurgeva tað lisna á donskum. Skrivligar uppgávur vóru eisini meira bert at endurgeva tað, ið ein hevði lisið ella hoyrt. Um skúlin lá í København, Tórshavn ella Viborg hevði ikki so nógv at siga.

Nú er hetta broytt. Næmingarnir skulu sjálvir vera við til at velja teirra pensum, teir skulu skriva uppgávur út frá teirra egna umhvørvi, teir skulu læra at skilja og meta um fyribrigdi í samfelagnum og náttúruni, sum ikki standa í bókini, og til prógvtøkuna skulu teir sjálvir leggja spurningin fram og geva sína egnu meting av honum út frá tí, teir hava lært og arbeitt við. Eisini eru næmingar nú meira við í tí dagliga arbeiðinum á skúlanum. Onnur fak enn fyrr hava tikið seg fram, lærugreinir sum: samfelagsfak, søga, landalæra og biologi.

Av hesum broytingum í skúlaskapinum koma nógvir trupulleikar hjá okkum. Ein er, at næmingarnir ikki sleppa at nýta tað mál, sum tey nýta í tí dagligu undirvísingini og í lívinum uttan fyri skúlan, bæði skrivliga og munnliga til prógvtøkuna. Tað er í veruleikanum ein treyt fyri at uppfylla krøvini, at teir sleppa tað. Ein annar trupulleiki er, at tær skrivligu uppgávurnar, serliga í samfelagsfaki og biologi eru gjørdar út frá donskum umstøðum. Uppgávurnar eru góðar og áhugaverdar, men okkara næmingar hava ikki umstøður til at svara uppá og meta um uppgávur, sum umhandla samrøður millum danskar politikarar og skatta- og inntøkumetingar har, um bóka- og nálaskógir og um froskar á einum campingplássi o.a. Skulu vit undirvísa næmingum í hesum, kunnu teir ikki sjálvir arbeiða við tí, tí teir ikki búgva í Danmark, og sleppa teir ikk tað, uppfylla teir ikki treytirnar.

Føroyska samfelagið er eisini byrjað at seta krøv til skúlan. Hetta sæst av allari skrivingini um skúlaskapin her á landi. Roynir skúlin at benda undirvísingina inn á ta leið, koma aft-

ur trupulleikar, tí so kann Direktoratið ikki uppfylla krøvini um censorar og próvtøkuuppgávur. Tvístøðan er sostatt, at vit skulu halda eitt »niveau«, so at okkara skúli stendur mát við skúlar alla aðra staðni, men eisini at lúka tey krøv, sum samfelagið setur. Sum er nú detta vit millum tveir stólar og einki av krøvunum kunnu lúkast uttan at næmingurin á onkran hátt verður svikin.

Sostatt er tað ikki klandurshugur ella máttloysi á skúlanum í Hoydølum, sum er orsøkin til »málstríðið«, og heldur ikki er tað onkur einstakur persónur ella bólkur, ið »stendur aftan fyri men »málstríðið« er eitt tekin um, at roynt verður bæði av lærarum og næmingum at lúka tey krøv, ið frá nógvum síðum verður sett til skúlan.

Hvussu tað fer at ganga fram yvir, skal ikki vera nortið við her, men verður tann pedagogiska ábyrgdin yvirtikin, má eitt stórt arbeiði gerast, soleiðis at »niveauið« verður hildið á einum høgum stigi, og samarbeiði við stovnar í øðrum londum verður neyðugt, men uppá treytir settar av tí føroyska samfelagnum.

Gunvør Hoydal




**mælisfólk á veg niðan í Ríkisumboðið**

# NÆMINGAFELAGIÐ

**Næmingafelag Føroya Studentaskúla.**

Skúlaárið byrjaði við stórum vónum og stórum ætlanum. Eftir at næmingarnir hövdu tingast í umleið tveir mánar um, hvussu næmingafelagið skuldi vera skipað, varð nevnd vald, og so skuldi verið klárt at farið til verkað.

Men hvussu gekst? Næmingafelagið sovnaði at kalla burtur og kvaklaðist bert við einar 2-3 ferðir í skúlaárinum, tá ið tann ringa samvitskan hjá teim kosnu nevndarlimunum gjördi um seg.

Nú skúlaárið er farið, er kanska nakað seint at royna at gera eina meting av, hvörjar orsökirnar til hetta vóru, men um tað eydnast, vil tað kanska gera, at farna skúlaár kortini kann koma næmingafelagnum til góðar. Vit kunnu jú læra av royndum, ikki minst teim ringu. og av slíkum hevur farna árið sum kunnugt verið ríkt.

Hövuðsuppgávan hjá eini nevnd skuldi verið at fingið vanligu limirnir upp í arbeiðið, meðan nevndin nevndin stýrir og leggur arbeiðið til ræттis. Soleiðis hevur enn ikki eydnast nakrari nevnd at fáa næmingafelagið at virka sum felag. Tær nevndir, sum hava verið á skúlanum. hava annaðhvört gjört tað, ið skal gerast sjálvar. ella tær hava latið tað ligið. Tað arbeiðið, ið hevur verið gjört, hevur alt verið einstaklingaarbeiði. Hetta hevur fört við sær eina hugsan um, at öðrvísi kann tað ikki vera.

Í öðrum lagi hevur tað elvt til, at tey fólk, ið annars kundu stýrt felagnum væl og sett onnur fólk í arbeiði, í staðin velja at fara í ein bólk og har gera arbeiðið sjálvi. Henda hugsan man eisini vera ein atvoldin til hjá fráfarandi nevnd at koma á lagið.

Tað vísti seg at vera sera torfört at fáa fatur á bókum og skjölum sum nevndin kundi fingið leiðbeining frá; og at fáa tey fólk sum hövdu nakrar royndir frá næmingafelagsarbeiðið. at leggja lag á. vísti seg at vera heilt vónleyst.

Vit síggja sostatt öll, at tað tikist at vera sera torfört at fáa næmingafelagið at virka.

Hví? Man einki vera at takast við á skúlanum? Eru vit öll púra nögd við skúlagongdina? Við innihaldið í undirvísingini, undirvísingshættirnar og býtið av lærugreinum? Er eingin áhugi fyri at tjakast um samfelagsligar spurningar, um yvirtöku av skúlanum ella bara koma saman til skemtunar?

Tí um so er, er jú einki at takast við hjá einum næmingafelagi. Men möguliga eru arbeiðsuppgávurnar so spjæddar og ov fáar til tað stóra umsitingartól, ið vit hava sett okkum fyri at brúka. Möguliga hevði verið ræттari at minka um talið á nevndum og stjórnum, inntil nog mikið var at gera hjá öllum. Vit hava sæð í ár, at tá ein bólkur hevur eina veruliga uppgávu. so kann hann eisini arbeiða væl - Hussið bert um málbólkin og blaðstjörnina á Vitanum. Hesin spurningur má í hvussu er umhugsast gjölla undir fyrireikingunum til felagsarbeiðið næsta ár.

Ein tann týdningarmesta (og tann dýrasta) læran, vit kunnu fáa burturúr farna skúlaárið, er, at uttan eina vælvirkandi nevnd kemur lítið burtur úr. Vit eiga tí, tá farið verður til arbeiðis av nýggjum. at leggja alstóran dent á, at nevndin verður sett væl og virðiliga inn í öll viðurskifti arbeiðnum viðvíkjandi.

Eitt annað, ið hevur sera stóran týdning, er. at allir limir mugu gera sær sína hugsan um, hvat eigur at gerast, og teir mugu koma fram við henni,

Neyndin eigur at fáa konstruktivan kritikk fyri sítt arbeiði, t.d. soleiðis, at ikki verður sagt: "Ger okkurt", men at nágreiniliga verður tilskilað, hvat viðkomandi næmingur heldur eigur at verða gjört. At hetta ikki varð gjört, mundi vera fremsta orsökin til væntandi arbeiðshugin hjá fráfarandi nevnd.

Tann dölska líkasælan yvir fyri öllum, sum varð gjört ella borið upp á mál, bæði í nevndini og í felagnum sum heild, má ikki fáa fótin fastan aftur komandi ár.

Niðurstöðan av tí, sum her er sagt, er, at fyri at fáa eitt livandi næmingafelag, krevst at bæði vanligu limirnir og nevndirnar vísa áhuga fyri og vilja til at gera nakað við tey mál, sum fletsöll hugsa um men lítið verður gjört við.

Limirnir í næmingafelagnum mugu ikki halda seg vera leysar av allari ábyrgd, tá tey hava sett kross á ein atkvöðuseðil. Og tað má krevjast av nevndini, at hon er fús at seta öll góð og rímilig tiltök í verk, so at stöðan, sum hon hevur verið í farna ári, ikki endurtekur seg.

MARTIN LYNGHAMAR

## UPPTØKA í studentadeildirnar

Fyri at sleppa á studentadeildirnar krevst realprógv ella at næmingurin hevur gingið tvey ár (í fyrsta og øðrum flokki) í trýára realdeild. Fyri at sleppa inn skal næmingurin fylla 16 ár innan 1. februar í skúlaárinum. Um næmingurin er yvir 19 ár, skal søkjast um undantaksloyvi, um annars pláss er.

Hjá teimum, sum vilja sleppa inn á nýmálsligu deildina, verður serliga lagdur dentur á karakterirnir í engilskum og týskum, umframt at prógv krevst fyri latínroynd. Fyri teir næmingar, ið ikki hava prógv fyri latínroynd, verður skipað fyri skeiði í latíni á skúlanum frá 18. august til síðst í oktober og fyri at standa royndina, ið hildin verður fyrst í november, krevst 6,o. Hjá teimum, sum vilja sleppa inn á matematisku deildina, verður serliga lagdur dentur á karakterirnar í matematikk og fysikk. Og so fyri báðar deildirnar karakterirnar í føroyskum og donskum.

# nøkur orð um næmingafelagið

Tá eg var biðin at skriva eitt sindur um næmingafelagið, set eg meg at blaða Vitar ígjögnum, um ikki okkurt var at finna. sum kundi siga nakað um sögu felagsins.

Frágreiðingar eru í Vitanum um, hvussu gingist hevur í felag num, so eg skal bara taka eitt sindur fram, sum kemur mær ti hugs, frá tí eg fyri góðum 20 árum síðan kom sum næmingur á Studentaskúlan.

Munurin millum tá og nú er sum kunnugt ógvuliga stórur. Bara 4 flokkar, ikki heldur so stórir altíð. Tað var tí skjótt mö ligt at koma at kenna hvör annan meir ella minni, ikki minst av tí at öll blivu koyrd út í fríkorterinum og hittust uttar fyri V. B. V. ella spákaðu eftir brúnni út á Skansan. Næming felag var, og minnist meg rætt varð roynt at halda fund anna hvört leygarkvöld. Tað tykist mær eisini, sum næmingar möttu nokkso væl upp, tá var heldur ikki so nógv at fara til. Har varð skift millum tjakfundir, fundir við upplestri og fyri- lestri. Onkuntíð vóru fundir saman við læraraskúlanæmingum. So vóru tær föstu veitslurnar: jólaveitsla og próvtökuveitsl og so onkur veitsla inn ímillum, tá lærari fylti runt, ella onkur fór. Flestar vórðu hildnar í gamla klubba uppi undir væðingini, hugnaligar og friðarligar veitslur, men kanska minnini gera sítt. Spældar vórðu sketsjir ella stuttir sjón- leikir. Fyri at fáa pengar til ymisk endamál sum filmstól, bókagrunn og kappróðrarbát skipaði næmingafelagið fyri fram- förslu av sjónleikum fyri almenninginum.

Stutt áðrenn eg kom á skúlan, hövdu næmingar fingið dramati- serað brot úr Feðgum á ferð, og skilti eg, at sjónleikararni vórðu væl fagnaðir, har teir komu. Nú eru vit aftur inni á hesum spurninginum um, hvussu tað var betri fyrr. Vit hildu ofta, at næmingarnir, sum hövdu verið frammanundan, hövdu fingið meira av skafti. Vit hugdu í gamlar Vitar ella í skr aðu fundarbókina, og har hildu vit okkum síggja so nógvar góðar pennar. Summir teirra skriva dúgliga enn í dag, men aðrir hava lagt frá sær med alla, teir fórust so tíðliga. Hj okkum sást eingin Viti í langa tíð.

Men so hendi nakað, sum fekk lív í næmingarnar og Vitarnar a fyllast. Tað gjördist revolutión. Men nú 20 ár aftaná kennis hetta so láturligt, at best er at tiga um tað. Eg havi ikki hugsað um tað fyrr, men tá eg nú líti aftur um bak til ta t ina, so var hetta kanska ein kám avspegling av teim viður- skiftum í samfelagnum, sum tá ráddu. Fá tíðarskeið munnu hav verið so ófriðarlig í Föroyum sum fyrra helvt av fimtiárunur

Næmingatalið vaks. Skúlin flutti niðan í Hoydalar undir egnu lon. Næmingafelagið fekk annað snið. Vitin gjördist störri c kom til tíðir reiðuliga ofta út. Eina tíð var hann ógvuliga mentunarligur. So kom tann kritiski Vitin. Prikini til lærar ar og skúla og samfelag gjördist nú rættilig högg. Tað var víst ungdómsuppreisturin, sum eisini gjördi vart við seg her á landi.

Næmingar fóru enntá at pilka við tær fyrisettu skipanir, vildu ikki tosa danskt og nú heldur ikki skriva danskt til próvtöku. Nú var tað ikki klandur um innanhýsis putl, men stríð vent ímóti mynduleikum. Ymisk er áskoðanin millum manna, hvussu rætt hetta er. Men ikki skerst burtur, at næmingar í dag hava meira dirvi og uppreistrarhug, enn vit hövdu, við teimum góðu og ringu fylgjum, tað eisini viðförir.

Hanus

## FORMENN felagsins frá tí felagi varð stovnað í 1938 TIL 1966

1. P. W. Háberg. jan. 1938-sept. 1938
2. Niels J. Arge sept. 1938-dec. 1938
3. Sverri Fon dec. 1938-nov. 1940
4. Kári Evensen nov. 1940-sept. 1941
5. Dánial Bærentsen sept. 1941-nov. 1941
6. Poul Joensen nov. 1941-jan. 1943
7. Jákup Johansen jan. 1943-jan.1944
8. Poul Lamhauge jan. 1944-sept. 1944
9. Johan Chr. Nielsen sept. 1944-okt. 1945
10. Jógvan Jensen okt. 1945-sept. 1946
11. Óli Mikkelsen sept.1946-febr.1947
12. Ról. W. Høgnesen febr. 1947-febr. 1948
14. Per Mohr febr. 1948-okt. 1948
15. Jørg. Joensen (Chips) okt. 1948-febr. 1949
16. Sverri Egholm febr. 1949-febr. 1950
17. Kjartan Mørkøre febr. 1950-sept. 1951
18. Einar Kallsberg sept. 1951-febr. 1952
19. Per Hansen febr. 1952-april 1952
20. Benadikt Davidsen april 1952-febr. 1953
21. Maria Sivertsen febr. 1953-febr. 1954
22. Frím. Símunnarson febr. 1954-febr. 1955
23. Heri Jensen febr. 1955-nov. 1955
24. Hanus A. Samuelsen nov. 1955-febr. 1956
25. Petur P. Dahl febr. 1956-febr. 1957
26. Ása Ellefsen febr. 1957-sept. 1957
27. Mikal Matras sept. 1957-febr. 1958
28. Flóvin Jacobsen febr. 1958-april 1958
29. Kj. Kristiansen (varaf.) april 1958-sept. 1958
30. Hanus Andreassen sept. 1958-febr. 1959
31. Joannes Dalsgaard febr. 1959-sept. 1959
32. Hans J. Debes sept. 1959-sept. 1960
33. Christoffur Jensen sept. 1960-febr. 1961
34. Poul J. P. Johansen febr. 1961-sept. 1961
35. Hans J. Debes sept. 1961-dec. 1961*)
36. Bárður Jacobsen dec. 1961-febr. 1962
37. Finnbogi Isaksen febr. 1962-sept. 1962
38. Eyðun Andreasen sept. 1962-sept. 1963
39. Ben Ole Carlsen sept. 1963-febr. 1964
40. Ben Ole Carlsen sept. 1963-febr. 1964
40. Tollakkur Djurhuus febr. 1964-sept. 1964
41. Jógvan Arge sept. 1964-febr. 1965
42. Súni Ellingsgaard febr. 1965-sept. 1965
43. Martin Fjallstein sept. 1965-febr. 1966
44. Marita Johannesen febr. 1966-sept. 1966
45. Birgir Arge sept. 1966-

*) Hann segði seg hava ov nógv at gera og bytti um við skrivaran.

# THOMAS NYGAARD



Thomas Nygaard

Fyrsti fyristöðumaður fyri Studenta- og preliminerskeið Föroya Lögtings og ein av stovnarum tess ( sí söguliga yvirlitið aðrastaðni ) var Thomas Nygaard.

Thomas Nygaard var av Eiði, föddur 26.9.1900. Læraraprógv tók hann í Tórshavn í 1920 og var síðani lærari í ymsum bygd um til 1925, tá ið hann fór niður á studentaskeið; hann tók studentsprógv í 1927 og fór so á universitetið í Keypmannahavn, haðani hann tók skúlaembætisprógv í 1933 (cand. mag. í enskum og týskum).

Heimafturkomin gjördist hann lærari við tað, ið tá æt Færöernes mellem og realskole í Tórshavn (nú realdeildin við Tórshavnar kommunuskúla), men var síðan 1937 meginpartin av síni starvstíð fyristöðumaður fyri studentaskúlan (heitið fyristöðumaður varð í 1949 broytt til rektari); hann legði frá sær her sum rektari í 1960, men helt fram sum lektor, til hann í 1962 tók við rektarastarvinum á Föroya Læraraskúla. Í 1965 legði hann starvið frá sær, men helt fram á sama skúla sum lektor, til hann í 1968 legði frá sær vegna aldur og við eftirlön.

Thomas Nygaard avrikaði eitt dygdargott arbeiði bæði sum skúlans fyrsti leiðari og sum lærari. Hann kravdi nógv av næmingunum sínum, men ikki minni av sær sjálvum. - Hann andaðist í Tórshavn tann 23.9.71 og er jarðaður á Eiði, sum hann altíð tráaði aftur til og hagar hann leitaði norður hvörja frílötu, ið beyðst. - Thomas Nygaard var ógiftur.

Arnbjörn Mortensen

Nú so nógv orðaskifti hevur verið um skúlaskap, fara vit at endurprenta greinina, sum Thomas Nygaard hevði í 50 ára minnisritinum hjá Føroya Lærarafelag.

# HIN HÆGRI SKÚLIN Í FØROYUM

*Eftir TH. NYGAARD studentaskúlastjóra, Tórshavn.*

Allastaðni, har alment fyriskipaður skúlaskapur finst, verður nú skilt millum ein lægri og ein hægri skúla; hin fyrri ætlaður fyri öll börn, frá tí tey eru 7 ára gomul ella fyrr, og til tey eru 14 ella summastaðni 15 ár; hin seinni fyri tey, sum hug og gávur hava at halda fram og búgva seg út til eitthvört starv í samfelagnum, sum krevur meiri kunnleika, enn tey kunna fáa í barnaskúlanum.

Hvussu hesin hægri skúlin er skipaður í teimum ymisku londunum, er eitt sindur ymist; men um okkara leiðir, t. e. í Norðanlondunum, verður hann vanliga býttur í tríggjar deildir ella trý stig: millumskúla, realklassa og gymnasium. Í millumskúlan koma börnini vanliga í 11-ára aldrinum og taka so millumskúlaprógv, tá ið tey eru 15 ár. Síðani kunnu tey annaðhvört ganga eitt ár í ein realklassa og taka realprógv, ella tey kunnu fara í gymnasiið og eftir trimum árum taka studentaprógv, ið skuldi verið váttan fyri, at tey umframt at hava fingið ta almennu mentan, sum vit krevja av teimum, ið rökja skulu eitthvört hægri starv í samfelagnum, eisini hava fingið tað kunnleikagrundarlagið, sum ger tey búgvin til at fara undir eitthvört studium við eitt universitet ella annan lærdan háskúla.

Av hesum báðum skúlunum er hin hægri nógv tann eldri og hevur longu fleiri hundrað ár á baki, meðan almennir fólkaskúlar mangastaðni neyvan enn hava fyllt 100 ár.

Eisini í Föroyum var ein hægri skúli ella látínskúli, áðrenn nakar fólkaskúli varð settur á stovn. Hesin skúlin varð tó avtikin aftur vegna næmingatrot í 1804, og var so eingin hægri skúlaskapur í Föroyum aftur, fyrr enn tann núverandi realskúlin í Tórshavn varð stovnaður í 1861. Aftur at hesum skúla varð so læraraskúlin lagdur í 1870. Hetta var so einasti hægri skúli í landinum í mong ár, til preliminerskúli varð stovnaður á Tvöroyri fyri einum 20 árum síðani. Seinni kom so preliminerskúli í Vági og síðani millum- og realskúli í Klakksvík, og í 1937 varð studenta- og preliminerskeiðið stovnað í Tórshavn.

Vit hava so statt í lötuni 5 skúlar í landinum, sum fyrireika til real- ella preliminerprógv, og ein studentaskúla. Av hesum skúlunum eru teir tveir — skúlin á Tvöroyri og skúlin í Vági — skipaðir sum 4-ára preliminerskúlar saman við fólkaskúlanum og taka börn í 12-ára aldrinum. Skúlin í Klakksvík og »Færöernes Mellem og Realskole« í Tórshavn eru skipaðir sum millum- og realskúlar og taka börn í 11-ára aldrinum. Preliminerskeiðið er skipað sum eitt 2-ára skeið, og markið fyri upptöku er her 14 ár. Í öllum skúlunum kann soleiðis prógvið, real- ella preliminerverða tikið í sama aldri; men fyrireikingartíðin er ymiss. Meðan millum- og realskúlin í Klakksvík eins og báðir preliminerskúlarnir í Suðuroy eru kommunalir, verður preliminerskeiðið hildið av lögtinginum. »Færöernes Mellem- og Realskole« verður ikki, sum rímiligt kundi verið, hildin av Tórshavnar bý, men av tí almenna. Hetta kemur sjálvandi av, at hann, sum navnið sigur frá, upprunaliga var ein skúli fyri alt landið; men tað er hann nú næstan bert av navni, síðani realskúlar eru komnir í hinum stóru bygdunum; tí ógviliga fá eru tey bygdabörn, ið nú ganga har. At



sama borði bera nú eisini húsaviðurskiftini í Tórshavn, sum gera tað næstan ómöguligt hjá bygdabörnum at fáa innivist, um tey so hava ráð til at gjalda tað, ið tað kostar at búgva í Tórshavn; og tað eru bert tey allar fæstu. Börn frá teimum smærru bygdunum eru soleiðis fyri ógviliga ringum býti viðvíkjandi hægri skúlaskapi; ja, fyri yvirhövur at koma upp í part mugu tey annaðhvört eiga onkun góðan í Tórshavn, sum vil hjálpa teimum og veita teimum innivist, ella mugu tey vera ógviliga vælhavandi. Og so er tað kortini tað almenna, ið heldur hendan skúlan, sum tí av röttum átti at verið líka atkomiligur fyri bygdabörn sum fyri börn úr Tórshavn. Tað má tí tykjast lögið, at ikki meira er funnist at hesum viðurskiftum, serliga av teimum lögtingsmonnum, ið skuu taka sær av áhugamálum bygdanna.

At saknurin av lagaligari atgongd til hægri skúlaskap kenst stórur úti á bygdunum, sæst eisini av tí, at fleiri og fleiri av teimum störru bygdunum liggja framvið at fáa stovnað realskúlar; men hetta er neyvan tann rætti vegurin; tí bæði fer hetta at vera ov dýrt, og eisini er vandi fyri, at góðskan av skúlunum minkar. Tað beinasta er ivaleyst, at tey evnagóðu börnini frá öllum teimum bygdunum, ið ikki sjálvar hava hægri skúla, verða samlað í einum skúla við kostdeild, har næmingarnir kunna búgva og gjalda fyri seg eftir förimuni, soleiðis at tey, ið eingi ráð hava, kunnu búgva frítt. Ein bæti fyri bygdabörnini var tað, tá ið preliminerskeiðið varð stovnað; tí her kundu tey, eftir at skúlagongdin heima var liðug í 14-ára aldrinum, koma og taka preliminerprógv eftir tveimum árum, um annars evnini rukku til. Hetta er væl bíligari enn at ganga 5 ár í millum- og realskúla; og tað hevur eisini víst seg, at bygdabörn meir og meir hava leitað til henda skúla. Við teimum 16 næmingunum, sum í ár eru tiknir fram til próvtöku,

hevur hesin skúlin í tey 11 árini, hann hevur virkað, klakt út 98 preliminaristar, og av hesum hava teir 71 verið av bygd, meðan bert 27 hava verið úr Tórshavn. Hetta kann tí av sonnum sigast at vera fyrst og fremst ein skúli fyri bygdabörn; men heldur ikki her eru atstöðurnar hjá teimum tær bestu. Spurningurin um innivist meldar seg aftur her; og síðani er tað ein spurningur um ráðini hjá foreldrunum. Fátæk börn úr smábygdunum eru avskorin frá at koma til hægri skúlar, hvussu góð evnir tey so hava; og tað er stórt spell. Væl er tað so, at tey sum rættiliga skara fram úr við evnum, koma sær fram onkursvegna, eisini uttan skúlagongd, um so skuldi verið; men ilt er at meta, hvussu nógv andsevnir fara fyri skeyti, tí tað almenna skettar ikki um at geva teimum gróðrar- og vakstrarlíkindir.

Vit eru nú mitt í eini broytingartíð. Ein nýggj stýrisskipan fyri landið er viðtikin, og mangt og hvat verður skipað um. Millum tey mál, sum lögtingið sjálvt kann átaka sær beinan vegin, er skúlaskapurin. Og tað skuldi so verið, at uppalingin av okkara ungdómi skuldi verið eitt tað fyrsta, vit sjálvir átóku okkum, tá ið talan er um sjálvstýri ella heimastýri, ella hvat tað nú verður kallað. Men tað ræður um, at tað verður gjört við skili, so at tað mest möguliga fæst burtur úr tí, sum ráð og vilji verður til at lata til hetta endamál.

Tað má gerast ein föst, men rúmlig skipan fyri alt landið, so at ikki verður farið fram eftir fummum. Viðvíkjandi hinum hægra



Studentarnir 1947

Lærarar: Erik Petersen, Thomas Nygaard, Chr. Haraldsen, Niels Ladegaard Pedersen og Knud Jacobsen

skúlanum ræður um, at skipað verður soleiðis fyri, at hann stendur opin fyri öllum teimum, sum hava hug og evnir til lesnað, og at tað ikki verða ráðini hjá foreldrunum, ið verða avgerandi fyri, hvörji börn, ið skulu ganga í hann, men einans evnini hjá börnunum. Tí ikki er ein ríkur pápi heldur enn ein fátækur, nakað prógv fyri, at barnið er skikkað til hægri skúlagongd.

Kostnaðurin má eisini umhugsast; tí ein fullfíggjaður skúlaskapur vil kosta okkara lítla landi eina nögd av peningi. Tað ræður tí um at finna fram á eina skipan, sum bæði er góð og ikki ov dýr. Ein spurningur, sum í hesum viðfangi hevur stóran týdning, er, nær tey, sum ganga skulu í hin hægra skúlan, skulu skiljast burtur úr. Nevnt er fyrr, at hetta vanliga verður gjört í 11-ára aldrinum; men ikki eru allir skúlamenn á einum máli um, at hetta er tað rætta, og júst nú er ikki so lítil orðadráttur um henda spurning, eins og skúlan í síni heild. Tað eru teir, sum halda, at öll börn eiga at ganga saman til tey eru 14 ár. Tað kann sjálvandi sigast nógv bæði fyri og ímóti hesum. Teir, ið halda uppá skilnað í 11-ára aldrinum — og teir munnu vera teir flestu — siga, at börnini við teimum góðu evnunum annars koma ov lítið áleiðis í hesum árunum, tí tey verða darvað av teimum, sum tyngri eru. Hetta er sjálvandi rætt; men her spæla so mong onnur viðurskiftir inn, sum ikki kunnu gloymast burtur. Í stórum plássum, har barnatalið er so stórt, at börnini á hvörjum aldursstigi mugu býtast í tveir ella fleiri bólkar, ber væl til at skilja tey burtur úr longu í 11-ára aldrinum, sum ganga skulu í hin hægra skúlan; við öðrum orðum, at stovna millumskúla. Tá kostar tað ikki stórt meir, og börnini kunnu búgva heima hjá foreldrunum. Öðrvísi í smærri plássum, har barnatalið ikki er störri enn at börnini á flest öllum aldursstigum kunnu undirvísast saman. Tað sigur seg sjálvt, at tað her verður ov dýrt at býta í tvíningar longu í 11-ára aldrinum. Tað krevst dupult tal av lærarum, dupult

tal av skúlastovum, og síðani krevst líka nógv av undirvísingar amboðum, sum til ein störri skúla. Og so er at minnast til, a vanliga er tað ikki meir enn okkurt um ein fjórðingur av börn unum, ið eru skikkað til at ganga í hægri skúla. Tað eigur tí ikk at verða hugsað um at stovna millumskúla á einum plássi, fyr enn barnatalið er komið upp um eini 400—500. Tað vil siga, at Föroyum eiga neyvan fleiri millum- ella realskúlar at verða setti á stovn enn á sinni. Spurningurin er nú, hvussu skipast skal fyri so at evnagóð börn frá smábygdum kortini kunnu fáa líka góða atstöður til at koma sær til hægri skúlagongd sum tey í teimum störru, har hægri skúli er; tí tað hava tey sjálvandi rætt til; me tað má sigast, at higartil hava tey verið við sviðið soð. Tvei kostir standa teimum nú í boði; annar er at fara í realskúlan Tórshavn, og tey, ið har fara, fækkast í hvörjum; hin er at far á preliminerskeiðið, og tey eru alt fleiri og fleiri, ið ganga tan vegin. Spurningurin er nú, um hetta bert er av neyð, tí at te her kunnu hjálpast við tvey ár, meðan tey annars skuldu gingið fimm ár í millum- og realskúla fyri at koma á sama málið, ell um fólk halda hendan skúlaformin hava aðrar fyrimunir eisini Tað er vert at kanna hendan spurningin eitt sindur gjöllari, n talan er um endiliga fyri álvara at stovna tann kostskúlan, ið s leingi hevur verið stór trongd til. Tí tað ger ein stóran mun, u hesin kostskúlin, umframt studenta- og læraraskúlanæmingum eisini skal hýsa næmingum, sum ganga 5 ár í millum- og realskúla ella næmingum, ið bert ganga tvey ár á preliminerskeið. Tað sigu seg sjálvt, at hetta seinna verður væl bíligari. Tó eigur kostnaðuri sjálvandi ikki at vera eina avgerandi, um tað kann prógvast, a annar av hesum skúlaformum hevur stórar fyrimunir í aðra mátar. Men er tað ivasamt, hvör ið fyrimunin hevur, so er ikk at ivast í at taka tann bíligara, fyri at tann peningur, ið spardu verður, kann koma skúlaskapinum til góðar á annan hátt. Efti

nú í 15 ár at hava verið lærari, deils við millum- og realskúlan í Tórshavn, deils við studenta- og preliminerskeiðið, mestsum líka leingi í báðum stöðum, kann eg av egnum royndum siga hetta um hesar báðar skúlaformar: Í millum- og realskúlanum fáa næmingarnir teirra kunnleika meira líðandi, og tað eru góðar stundir til at taka alt frá grundini av, og kunnleikin kemur tí ivaleyst at sita fastari. Næmingarnir hava tað lættligt, kanska ov lættligt; og teir hava stundir til mangt og hvat frammíhjá. Men júst hetta kann vera ein vandi hjá teimum, sum burtur eru heiman ífrá og ongan hava at ansa eftir sær, hvussu teir nýta sína frítíð. Og kortini kann tað ofta vera strígið at fáa hesar næmingarnar at gera tað sindrið, teir skulu, og ein ivast mangan í, um ikki nógv stríð kundi verið spart, um bíðað varð, til næmingarnir vóru meira búnir. Á preliminerskeiðinum har aftur ímóti hava næmingarnir tað ov strevið, helst tí at forkunnleikin aloftast er ov vánaligur, og eisini tí at tað meira eru ráðini enn evnini, ið eru avgerandi fyri, hvör ið kemur har. Tíðin er so knöpp at læra tann fyriskrivaða settningin í, at slíkar týdningarmiklar greinir sum likamsvenjing og sangur mugu útihýsast; og tað má sigast at vera eitt ógvuliga stórt brek. Men annars eru næmingarnir her vanliga fúsir til verka, og ein hevur varhugan av, at teir eru komnir av egnum huga og við vilja til at læra nakað. Og ég kann av egnum royndum siga, at eg eftir tveimum árum á preliminerskeiðinum havi fingið líka góð úrslit sum eftir fimm árum í millum- og realskúlanum. Og eg hugsi eisini, at hetta kann sigast sum heild um allar lærigreinir. Og á studentaskeiðinum standa hesir næmingarnir ikki aftan fyri teir, ið hava tikið real- ella preliminerprógv frá hinum skúlunum.

Um nú var skipað so fyri, at upptökuroynd varð hildin til preliminerskeiðið, og eitt vist mát av kunnleika varð kravt í hövuðsgreinunum: föroyskum, donskum, rokning, og kanska eisini

ein hylling í matematikk og eingilskum, so at minkað kundi veri um tímatalið í hesum greinum, og likamsvenjing og sangur o kanska okkurt annað kundi verið tikið upp í staðin, so tykis mær, at hetta hevði verið ein góður og væl hóskandi skúlaformu fyri börn frá bygdunum. Hann hevur tann fyrimun, at börnir kunnu vera heima hjá foreldrunum, til tey eru 14 ár; og tað ma hóast alt vera tað besta. Og ikki hugsi eg annað, enn at tað, te í hesum árunum kunnu læra úti á bygdunum, bæði á sjógvi o úti í böi og haga, er líka nógv vert sum tað sindrið av skúla kunnleika, tey kundu fingið meir við at ganga í millumskúla Tórshavn.

Spurningurin er nú, hvussu börnini kunnu fyrireikast til hes upptökuroynd. Tað kann gerast upp á tveir mátar. Eitt eittár fyrireikingarskeið til preliminerskeiðið kundi verið stovnað, ha börnini kundu komið longu, tá ið tey vóru 13 ára gomul. Eisir hevði borið til, serliga í teimum hálvstóru bygdunum, at havt ein útvíðkaða undirvísing tað seinasta ella tey seinastu skúlaárini fyr tey, sum hövdu hug og evnir at fara á preliminerskeiðið.

Um so varð skipað fyri, sum her er leysliga skotið upp, hald eg, at preliminerskeiðið hevði verið ein góður og til okkara viður skiftir væl hóskandi grundarskúli undir studentaskúlanum. Me hvussu so við millum- og realskúlanum í Tórshavn? Ja, hann e jú longu, sum er, at kalla bert ein skúli fyri börn úr Tórshavn; o tí eigur býráðið at taka sær av honum, ella — hvat ið ivaleyst er ta besta — eitt samarbeiði má koma í lag millum býráð og lögting soleiðis at hesir báðir stovnar einast um at halda ein skúla, sun rúmar millum- og real-, lærara-, studenta- og preliminerskúla soleiðis at tað stendur teimum bygdabörnum, ið heldur vilja tað frítt at ganga í millum- og realskúla, og umvent at tað stendu teimum börnum úr Tórshavn, ið heldur vilja tað, frítt at ganga preliminerskeiðið. Tað skuldi borið til, eftir samráðing millun

býráð og lögting, at býtt tað, ein slíkur skúli kostar, á hóskandi hátt sín ámillum, og eisini at sett eitt stýri fyri skúlan, har báðir partar vóru hóskandi umboðaðir. Men fæst slíkt samarbeiði ikki í lag, so má býráðið taka millum- og realskúlan, og lögtingið má taka sær av lærara-, studenta- og preliminerskúlanum. —

Um studentaskúlan er tað at siga, at hann sum skjótast má skipast um til eitt gymnasium. Tí eins og á preliminerskeiðinum er tíðin eisini her so knöpp, at bert er tíð til tað allar neyðturviligasta, og neyvan tað. Næmingarnir hava lítlar og ongar stundir til at íðka ítrótt ella til felagslív av ymiskum slagi, sum kundi verið av so stórum týdningi júst í hesum árunum. Men henda broyting krevur meiri húsarúmd, enn skúlin nú hevur; og tað er longu ov trongligt, sum er. Men nú sær út til, at vit, áðrenn langt umlíður, fáa ein nýggjan skúla. Tí lögtingið er farið undir at seta av 300.000 kr. um árið til hetta endamál. Heldur henda ætlan, skuldi ein prýðiligur bygningur kunnað setst upp fyri hendan pening. Men tað er at vóna, at vit ikki skulu bíða í 10 ár, áðrenn farið verður undir byggingina.

Hvar skal nú hesin skúlin standa? Tí enn er hetta ikki avgjört. At tað verður í ella nærindis Tórshavn, er ivaleyst tað natúrligasta og besta. Ein möguleiki er tað ökið, har realskúlin nú stendur. Tað hevði verið ógviliga högligt hjá teimum næmingunum, ið hava teirra heim í Tórshavn; men tað er lítið hóskandi at hava ein kostskúla liggjandi inniklemmaðan millum hús til allar síður. Har aftur ímóti mátti hetta plássið verið sum skapt til at seta tann nýggja kommunuskúlan á, so mitt sum hetta liggur í býnum. Ein kostskúli átti helst at ligið eitt sindur burtur frá býnum við rúmligum plássi uttan um; tó ikki so langt frá, at vegurin verður ov langur at ganga hjá teimum næmingum, sum búgva í býnum. Eitt slíkt pláss skuldi ikki verið so ringt at funnið.



Studentarnir 1955

ENDURPRENT ÚR ÁRSRITINUM 1964

## YVIRLIT YVIR STUDENTASKÚLASØGUNA

### 1. *Hægri skúlar undan studentaskúlanum*

Føroyar eru bygdar eitt sindur aftan á 800 av norskum víkingum, men trý hundrað ár gingu, áðrenn vit hoyra um nakran skipaðan hægri skúla. Vit hoyra tó, at Tróndur í Gøtu, um leið 1000, hevði unglingar í læru hjá sær, men her man neyvan vera tala um nakran skúla. Fyrsti hægri skúlin, vit vita nakað um at siga, er prestaskúlin á bispasætinum í Kirkjubø. Ikki er greitt, nær hann er settur á stovn; men ætlast kann, at tað hevur verið stutt aftaná, at Kirkjubø gjørdist fast bispasæti, eitt sindur aftan á 1100. Vit vita í hvussu so er, at norski kongurin Sverri, ið er føddur um 1150 og vaksin upp í Føroyum, lærdi til prest hjá Rógva bispi, sum varð vígdur í 1162 og enn er bispur í 1174. Til góðsku man hesin skúlin hava verið sum hinir norsku prestaskúlarnir, av tí at fleiri av bispunum høvdu verið lærarar við prestaskúlar í Noreg (Bergen), áðrenn teir komu higar; og bisparnir munu helst hava borið størsta partin av byrðuni sjálvir — saman við hjálparprestum sínum — við tað at einki dómkapitul var í Kirkjubø.

Hesin skúlin varð niðurlagdur á reformatiónstíðini, av tí at kongur tók peningaliga grundarlagið, jørðina, undan honum. Men stutt aftaná, í 1547, hoyra vit um latínskúla í Havn. Havnarprestur skuldi vera lærari — seinni fekk skúlin lærara sjálvur. Skúlin var fyrstu tíðina hildin í prestagarðinum; men í 1630 vórðu bygd skúlahús úti á Reyni, og í 1750 vórðu aftur bygd nýggj hús — eisini úti á Reyni. Ójavnt hevur sjálvsagt verið, hvussu hesin skúli hevur verið til dygdar; men tá ið Lucas Debes prestur var deyður í 1675, sigst at ganga niður á bakka. Skúlin andi til 1794, tá ið seinastu næmingarnir fóru út, og í 1804 doyði fyristøðumaðurin. Men verunliga er skúlin onga tíð avtikin.

Nú var eingin hægri skúli í Føroyum. Studentaskúli kom ikki aftur fyrr enn í 1937, tá ið Studentaskeið Føroya Løgtings

varð sett á stovn. Men í 1861 kom landsrealskúlin í Havn. Hann var til 1916 har, sum H. N. Jacobsens Bókahandil nú er — har hann »lá so friðarligt uttan fyri býin, og stutt var til drekkivatn úr Ovasta Dammi í Havnará« (Mitens: Realskúlin, 1961, bls. 10). Realskúlin hevur seinastu 30 árini ikki verið landsskúli, men Havnarskúli, við tað at fleiri tílíkir skúlar eru komnir — á Tvøroyri í 1923, í Vági 1928, í Klaksvík 1935, og nú eru hesi seinastu 10 árini komnir preliminerskúlar í Vestmanna, á Glyvrum, í Fuglafirði og á Giljanesi í Vágum. Realskúlin í Havn verður nú niðurlagdur, av tí at kommunuskúlin fær realdeild.

Í 1870 varð læraraskúli settur á stovn. Hann helt til í realskúlanum, og næmingarnir høvdu fyri ein part tímar saman við realskúlanæmingunum. Læraraskúlin hevur livað undir ómetaliga trongum korum alla tíðina: Eingi hús og ongar lærarar sjálvur. Hann hevur hildið til í realskúlanum oftast við skúlagongd, í hvussu so er fyri ein part, seinnapart á degi, og lærararnir hava verið teir somu sum við real- og kommunuskúlan, og síðani 1937 eisini lærararnir við studentaskúlan. Fyri trimum árum síðani fekk hann tó høli í gamla kommunuskúlanum, og hann hevur nú fýra fastar lærarar, men framvegis ein hóp av leysum lærarum frá hinum skúlunum.

Vanligt plagar ikki at vera at rokna háskúlarnar upp í hægra skúlan. Men háskúlin gevur kunnleika út um tað, sum fæst í barnaskúlanum, og so hevur hann eisini, serliga hjá bygdafólki, mangan verið fyrsta stigið á vegnum til studentaskúla og universitet; tí eigur hann eisini at nevnast í hesum yvirliti. Tað var í 1899, at Símun av Skarði og Rasmus Rasmussen, sum høvdu verið á donskum háskúlum, fingu háskúla á føtur norðuri í Klaksvík. Árið eftir bygdu teir sær hús í Føgrulíð, og í 1910 fluttu teir til Havnar, út á Frælsið.

Aðrir skúlar hava eisini verið og eru, eitt nú sjómansskúlar, tekniskir skúlar og handilsskúlar; men av tí at teirra uppgáva fyrst og fremst er at búgva fólk út til praktiska vinnulívið, skulu teir ikki takast við her.

### 2. *Ætlanir um statsgymnasium*

Tey stívu hundrað árini, frá tí gamli latínskúlin var niður-

lagdur, til 1900 vórðu ikki meira enn 31 føroyingar studentar; men longu tey fyrstu 22 árini aftan á aldaskiftið komu 32 studentar, og til 1935 98. Næstan allir høvdu lisið til student í Danmark, onkur hendinga í Íslandi. Tá ið nú talið á studentum aftan á 1900 fór at vaksa munandi, fóru menn at hugsa um at fáa studentaskúla í Føroyum. Eisini man tjóðskaparrørslan hava gjørt vart við seg her.

Fleiri ferðir verður studentaskúlamálið havt frammi; men einki kemur burturúr: tað verður lagt burtur aftur ferð eftir ferð. Men frá 1926 er eingin steðgur í, fyrr enn skúlin er komin í 1937.

Høvuðskeldan, sum eg havi nýtt til hesa viðgerð av studentaskúlamálinum, er Løgtingstíðindi. Tað er so at siga ógjørligt at koma til skjøl, sum kundu gjørt hesa mynd eitt sindur meira fjølbroytta.

Tað, sum setur ferð í arbeiðið fyri at fáa studentaskúla í lag, er eitt bræv, sum 13 føroyskir akademikarar í 1926 skriva Føroya Løgtingi við bøn um, at tingið á hvørjum ári skal lata 5-10.000 krónur í ein grunn, sum skal »veita studning ella lán til teir studentar, sum helst tey seinastu studentaárini hava tað neyðugt.« Fíggjarnevndin fær brævið til viðgerðar, og tað kann kanska sigast, at viðgerðin, sum málið fær, er eitt sindur løgin. Tí í staðin fyri at seta okkurt uppskot fram um studnings- ella lánigrunn, leggur nevndin uppskot fram um, at tingið skal biðja skúlastjórnina hjá amtinum til ólavsøkutingið 1927 gera eitt greiniligt uppskot um at fáa í lag studentaskúla í Havn — tað skal tó sigast, at ein minniluti í fíggjarnevndini skeyt upp, at tingið skuldi lata 2000 krónur í beinleiðis studningi til føroyskar studentar, ið vóru í ferð við at gera seg lidnar við lærdan lestur — sostatt einki um grunn; men fyrra uppskotið varð samtykt.

Skúlastjórnin beindi málið til Jákup Dahl, próst. Jákup Dahl heldur, at málið er komið ov lítið áleiðis til, at hann kann gera nakað rættuligt uppskot; men hann nemur tó í einum skrivi til skúlastjórnina við »ymist, sum kann peika á tann veg, sum .... má verða gingin, um tað fyri álvara skal vera farið undir hetta mál.« Í hesum hugleiðingum sínum vísir hann á, at í mun til studentatalið í Danmark og Íslandi skuldu verið 12 føroyskir

studentar um árið (í árunum 1900 til 1927 vóru onga tíð meira enn 6 um árið; men hetta tal hevði óivað verið væl størri, um skúli var í Føroyum). Natúrligt er at knýta studentaskúlan aftur at tí skúla, sum er frammanundan, Føroya millum- og realskúla. Studentaskúlin skal vera fyri alt landið, og tí skal hann vera kostskúli. Fyri fyrst mugu vit hjálpast við eina deild, og hann heldur tað vera best, at tað verður fornmáladeildin. Tó skal tann munur vera á okkara skúla og skúlunum í Danmark, at vit skulu hava prógv í føroyskum. Dahl nevnir eisini møguleikan fyri eini serligari føroyskari deild, soleiðis at næmingarnir lesa nakað av øllum lærugreinum í øllum trimum deildunum (fornmálsligu, nýmálsligu og matematisku deildini), men hann væntar hetta vera torført og ivasamt, um tað er hóskandi. Tí er betri at hava eina deild, sum hevur staðið sína roynd, og so leggja so nógv av føroyskum aftrat henni, sum tørvur er á. Neyðugt verður at seta tveir cand. mag.ar aftur at teimum lærarum, sum eru við realskúlan frammanundan, og so skulu byggjast tríggjar skúlastovur aftrat.

Skúlastjórnin leggur hetta skriv fyri tingið, sum samtykkir at biðja skúlastjórnina um tað sama sum árið fyri (greiniligt uppskot) og annars at goyma málið til árið eftir. Í 1928 sigur skúlastjórnin tinginum frá, at hon hevur ikki verið før fyri at framt uppskotið, sum løgtingið hevur biðið um; hon vil hava hetta goymt eitt ár aftrat, fyri at hon kann fáa gjørt uppskotið.

Á somu tingsetu kemur uppskot frá sambandsmonnunum í fíggjarnevndini um at endurnýggja samtyktina frá 1926. Men javnaðarmaðurin P. M. Dam og sjálvstýrismenninir Jóannes Patursson og Niclas Niclasen hava helst borið ótta fyri, at einki fór at koma burtur úr hesum ella í hvussu so er, at tað fór at ganga ov seint; tí seta teir uppskot fram um, at *tingið* skal senda »ein dugnaligan skúlakønan mann, sum vil granska studentaskúlaskipan í øðrum londum, og harútav geva tinginum eitt fullfíggjað uppskot um, hvussu ein føroyskur studentaskúli eigur at skipast.« Hetta uppskot verður samtykt, og heitt verður á Richard Long, lærara, sum fer til Íslands og Danmarkar. Til tingsetuna 1929 hevur Richard Long gjørt eitt uppskot, sum við fyrstu viðgerð verður beint í skúlanevndina hjá løgtinginum,

sum so út av hesum uppskotinum ger eitt álit, ið verður lagt fyri tingið.

Men áðrenn meir verður sagt um, hvussu gekk við hesi tingsamtykt, skal verða greitt gjøllari frá uppskotinum hjá Richard Long og álitinum frá skúlanevndini, við tað at her verður peikað á ein spurning, sum er frammi beint nú: samskipingina av læraraskúlanum og studentaskúlanum, sum avgjørt átti at verið umhugsað eina ferð enn, áðrenn farið verður undir at byggja læraraskúlan so langt burtur frá studentaskúlanum sum til ber, um báðir skulu vera í Havnini. Tó skal verða sagt beinan vegin, at læraraskúlin tá hevði bert ein flokk í senn, og hann gekk í 3 ár; nú eru tveir flokkar (umframt ein fyrireikingarflokk annaðhvørt ár) í senn, og lærutíðin er 4 ár. Tá var eingin fastur lærari, nú eru 4; men hóast tað hevur skúlin enn í minsta lagi 10 leysar lærarar frá kommunuskúlanum og studentaskúlanum.

Víst verður á í uppskotinum frá Richard Long, at ov mikið var av skiftandi lærarum við læraraskúlan; skúlin verður noyddur til at taka teir, hann kann fáa hendur á ár undan ári. Eingin lærari — vit kunnu siga nú: ov fáir — er, sum kann gera sær hetta til lívsuppgávu at vera lærari júst á hesum skúla. Tingið hevur í fleiri ár arbeitt við nýskipan av hesum skúla og hevur miðað ímóti at fáa sjálvstøðugan læraraskúla við sínum egnu lærarum; men tað fer ikki at bera til at fáa fult útbúnar lærarar í øllum lærugreinum.

Samstundis hevur tingið arbeitt við studentaskúlamálinum. Víst verður í einum áliti á, at 20 føroyingar ganga á studentaskúla í Danmark, og fleiri høvdu verið, um skúli var í Føroyum. Tær stóru útreiðslurnar hava rætt menn, og tí er skúli ikki fingin í lag. Men í staðin fyri at hugsa um hesar báðar skúlaætlanir í tveimum, eiga vit at síggja tær undir einum. Gera vit tað, verða útreiðslurnar minni, og vit fáa eina loysn av hesum málum, sum er betri bæði fyri lærara- og studentaskúlan. Best hevði verið við tveimum deildum, nýmálsligari og matematiskari; 6 lærarar (cand. mag.ar) mugu vera. Studentaskúlin skal gerast sum framhald av realskúlanum; men tímatalvan hjá studentaskúlanum skal samskipast við tímatalvuna hjá læraraskúlanum, og harvið er spurningurin um vísindaliga útbúnar

lærarar til læraraskúlan loystur. Hetta er bert ein partur av uppskotinum hjá Richard Long; tað verður ov drúgt í hesum viðfangi at taka alt við.

Í staðin fyri skal so verða givið eitt yvirlit yvir, hvussu skúlanevndin út av hesum uppskoti hevur hugsað sær at skipa studentaskúlan. Nevndin er sinnað at hava tvær deildir, nýmálsliga og matematiska; gongur við til samskipingina við læraraskúlan; skúlagongdin skal vera ókeypis; næmingarnir skulu hava bæði munnligt og skrivligt føroyskt til próvtøkuna; kostdeild eigur avgjørt at vera, byggjast má aftrat realskúlanum, og hugsast má eisini um at byggja hús til læraraskúlan í samband við byggingina til studentaskúlan; læraraskúla-, real- og millumskúlanæmingar eiga eisini at sleppa at búgva á kostdeildini; staturin og løgtingið skulu í felag gjalda útreiðslurnar til nýbygging og rakstur; nøkur fríplass eiga at vera. Nevndin sigur, at stórur áhugi er á tingi fyri hesum máli; men nakrir tinglimir eru í iva, um so nógvur peningur kann fáast. Uppskotið, sum skúlanevndin setur undir atkvøðu, er hetta: Skúlastjórnin verður biðin um til næstu tingsetu (1930) at gera uppskot um at stovna ein studentaskúla í samband við Føroya millum- og realskúla við álitinum hjá skúlanevndini sum grundarlag og fáa yvirlit yvir, hvat nýbygging og rakstur koma at kosta. — Sum sæst av uppskotinum er einki nevnt um samskipingina við læraraskúlan; men tað er tí, at hesir báðir skúlar framvegis skulu vera hvør sín stovnur, meðan dagliga arbeiðið skal samskipast. Uppskotið varð samtykt við stórum meiriluta.

Í 1930 legði skúlanevndin aftur fram álit, har sagt verður frá, at skúlastjórnin hevur fingið ymsar upplýsingar, til dømis hvussu Birkerød skúli, sum hevur kostdeild, og Gagnfræðarskúlin á Akureyri eru skipaðir. Yvirlit er yvir kostskúladeild til 50 næmingar og 10 starvsfólk. Men tekningar hevur skúlastjórnin ikki fingið til vega, av tí at einki enn var avgjørt um, hvussu stór kostdeildin skuldi vera, og so hevur tingið heldur ikki játtað pening til tær. Skúlastjórnin hevur vent sær til undirvísingarministeriið fyri at biðja teir siga sína støðu og biðið teir víst á ein arkitekt, sum kann gera tekningar og kostnaðarætlan. Men einki svar er komið frá ministeriinum. Nevndin heldur, at tað verður ov stórur skúli, um hann eisini skal vera

kostskúli fyri allar Føroyar, og mælir tí til, at millumskúlar verða stovnaðir í teimum størru bygdunum, so at bert verður pláss fyri 30 kostnæmingum. Landsnevndin eigur at útvega bráðfeingis tekningar, so at gongd kann koma á, og hetta skal hon gera til næstu tingsetu.

Í 1931 er aftur álit frá skúlanevndini. Tekningarnar, sum landsnevndin í 1930 var biðin um at fáa, eru komnar; kostnaðurin er mettur til 130.000 krónur. Her verður upplýst, at skúlastjórnin hevur spurt undirvísingarministeriið um møguleikarnar fyri at fáa statsstudning til studentaskúla eftir teimum ætlanum, sum løgtingið hevur arbeitt við tey seinastu árini. Svarið upp á henda spurning hevur tingið fingið frá amtinum í brævi 22. september 1931, og tað var nei. »Skúlamálaráðið sigur, at Føroyingar eru ov fámentir til at bera ein studentaskúla, at føroyskir næmingar kunnu, sum statt er, fáa ta neyðturvuligu undirvísing (í Danmark), og at Føroyingar hava ein fyrimun til at koma inn á statsins kostskúlar, og tessvegna sær ministeriið seg ikki ført fyri at seta fram uppskot til stovnan av einum studentaskúla í Føroyum.« Ikki vóru tað bert undirvísingarministarin og álitismenn hansara, sum vóru í iva, um tað bar til at hava studentaskúla í Føroyum. Sjálvt tá ið studentaskeiðið hevði verið í gongd eini trý ár, skrivar stjórin, Th. Nygaard, í eini frásøgn til tingið, at sum nú sær út, eru vónir um, at skúlin fer at trívast.

Nevndin sigur víðari, at hetta svar frá undirvísingarministeriinum er so greitt, at ikki gerst meir við málið í hesi atløgu. Men teir vilja ikki gevast, og nevndin er samd um, at málið eigur at verða tikið upp á øðrum grundarlagi: at fáa eitt studentaskeið sett á stovn.

## 3. *Ætlanir um studentaskeið*

Tá ið ætlanin um statsgymnasium endaliga var dottin niðurfyri við svarinum frá undirvísingarministeriinum, varð beinan vegin farið undir at gera fyrireikingar til studentaskeið. Í sama áliti, har skúlanevndin kunnger løgtinginum avgerðina hjá undirvísingarministeriinum, leggur hon fram eina fyribils ætlan um skeið. Hóast tvær av grundunum, sum undirvísingarministeriið førdi fram, tá ið teir sýttu føroyingum at fáa studenta-

skúla, vóru, at føroyingar høvdu góðar atstøður at lesa til student sum var, so heldur nevndin tó, at tað verður aldri so lagaligt at lesa til student hjá føroyingum, »sum ynskjandi er, uttan at skipað verður soleiðis, at teir kunna lesa til student heima í Føroyum, (tí) vilja vit gera eina roynd til at fáa hetta mál framt....« Nevndin er greið yvir teir trupulleikar, sum eru (her man verða hugsað um peningaligar trupulleikar), men heldur tó, at meira er at vinna enn at tapa, og tí er treystið eisini gott á hesum monnum, ikki minst av tí, at tingið yvirhøvur alla tíðina síðani málið kom fram hevði tikið so væl undir, og tí kunnu teir heldur ikki vera í iva um, »at vera allir partar samdir um at fremja málið á besta hátt, má tað kunna útinnast.« Henda vissa teirra var heldur ikki gjørd fyri skommum, tí av 23 tingmonnum atkvøddu 20 fyri uppskotinum.

Nú greiðir so nevndin frá, hvussu hon kundi hugsað sær skeiðið skipað. Tað skal vera í Havn og fáast í lag við studningi frá Føroya Løgtingi. Tá ið tað ber til aðrastaðni at hava tílík privatskeið gangandi uttan almennan studning, má tað bera til eisini í Føroyum. Tá her verður sagt: uttan almennan studning, mugu vit minnast til, at løgtingið hevði heilt aðra støðu tá enn nú, við tað at tað at kalla bert var amtsráð til 1948. Skeiðið skal byrja við einari nýmálsligari deild. Tveir cand. mag.ar skulu setast, annar skal vera fyristøðumaður. Tímalærarar skulu so setast til teir tímar, sum kanska verða ov nógvir til hesar báðar, og so eisini til tær lærugreinir, sum teir ikki kunnu átaka sær.

Stýrið fyri skúlanum skal vera: teir føstu lærararnir og so í minsta lagi 3 tingvaldir limir, møguliga eisini ein samskipan við skúlastjórnina hjá amtinum. Húsaspurningin hugsar nevndin sær loystan á tann hátt, at tað verður møguligt at leiga skúlastovur frá realskúlanum seinnapart á degi. Hetta skeið ætlast at kosta 12.540 krónur, sum løgtingið skal lata. Men peningavánirnar vóru so ringar beint tá, at nevndin vildi ikki seta uppskot fram um hetta, men skeyt í staðin fyri upp at seta eina trímannanevnd, sum skuldi gera eitt meira fullfíggjað uppskot um, hvussu skúlin skuldi skipast, og tímaskipan. Hetta skuldi so leggjast fyri tingið árið eftir.

Í trímannanevndini komu at sita Johan Kallsoy, Johan Poul-



góða undirtøku; men tann munur er hesaferð, at vinnunevndin ger eitt »kvett«, og so kom skúlin.

### 4. *Studentaskeiðið verður stovnað*

Úrslitið av arbeiðinum hjá vinnunevndini var, at Thomas Nygaard hevði uppskot um 2-ára studentaskeið liðugt á ólavsøku 1937; men longu í juni mánað varð lýst í bløðunum, at ætlan var at fara undir studentaskeið 1. september. Uppskotið hjá Nygaard er í stuttum hetta: byrjað verður við einum 1-árs fyrireikingarflokki (í staðin fyri henda 1-árs fyrireikingarflokk kom tað at vera 2-ára preliminerskeið) og einum nýmálsligum studentaflokki. Hann hevur eisini uppskot um, hvørjir lærarar skulu vera fyrsta árið, Kristian Haraldsen, ið varð cand. mag. í týskum og fronskum í januar 1937, Erik Petersen, cand. mag. í donskum og musikki í juni 1936, Thomas Nygaard, cand. mag. í eingilskum og týskum í juni 1933. Umframt teir skuldu vera Christoffer Lützen, yvirlærari við realskúlan, og Jákup Dahl, próstur.

Vinnunevndin fær uppskotið hjá Thomas Nygaard, og tað næsta, sum nú hendir, er, at *skúlin byrjar 1. september sama ár* (1937) — uttan at nøkur tingsamtykt var fingin, og uttan at tingið hevði játtað pening. Tað var Edw. Mitens, formaður í vinnunevndini, sum við stuðli frá hinum báðum limunum í nevndini, P. M. Dam og Kristian Djurhuus, fekk hetta í lag. Ábyrgdina fyri, at hetta var gjørt uttan um tingið, og eisini peningaligu ábyrgdina, tók Mitens upp á seg. 22. september 1937 gevur Mitens løgtinginum frágreiðing um tað, sum fram er farið, har hann millum annað sigur: »Av tí at tað nú var gjørligt at fáa 2 lærarar, helt eg, at tað var neyðugt at taka avgerð, og at málið kundi fara fyri bakka, um eitt studentaskeið ikki varð byrjað í ár.

Vinnunevndin hevði ikki heimild at seta slíkt skeið á stovn, og ongan játtaðan pening hartil; men av nevndu orsøkum, og tí at kostnaðurin ikki var so stórur sum fyrr ætlaður, og ikki størri enn, at hugsandi var, at tingið maktaði at loysa spurningin, spurdi eg hinar limirnar av vinnunevndini, um teir vildu mæla tinginum til at játta tær 8500 krónurnar, sum skeiðið tá varð roknað at kosta fyrsta árið. Peter Mohr Dam segði seg

sen og P. M. Dam. Nevndin hevur ikki ligið á løtu síðu. Studentaskeiðið í Høng hevur verið fyrimyndin hjá teimum. Álitið, sum henda nevnd leggur fyri tingið, er ikki nógv øðrvísi enn álitið frá skúlanevndini árið fyri (1931). Høvuðsmunurin er tann, at her verður hildið, at skúlin eigur at hava tvær deildir, og so verður eisini hildið, at skúlin eigur at hava preliminerskeið, so at ikki bert tey, sum hava gingið í realskúla, skulu hava líkindi at sleppa á studentaskeiðið, men eisini unglingar, ið ikki hava gingið í realskúla. Nevndin heldur, at tað er neyðugt at seta 3 cand. mag.ar. Og so verður upplýst, at amtmaðurin hevur lagt álitið frá skúlanevndini 1931 fyri undirvísingarministeriið, sum aftur hevur lagt tað fyri sín álitismann í studentaskúlamálum, »Undervisningsinspektøren for Gymnasieskolerne« Højberg Christensen, og hann er ógvuliga áhugaður fyri hesum skúla, men heldur, at neyðugt verður at hava 4 cand. mag.ar.

Fyri at vísa á, hvussu neyðugt tað er at fáa henda skúla, peikar nevndin á ymist — eins og aðrar nevndir høvdu gjørt frammanundan — sum talar fyri hesum, eitt nú, hvussu ólagaligt tað er bæði fyri foreldrini og børnini, at ikki ber til at lesa til student í Føroyum, men at tað er neyðugt at fara til Danmarkar á so ungum aldri; millum annað vísa teir á, at tað verður út ímóti dupult so dýrt at lesa til student í Danmark, sum tað hevði verið í Føroyum eftir tí ætlan, sum gjørd er.

Nú verður málið beint í fíggjarnevndina, og so kemur ikki meir burtur úr fyribils. Løgtingið kundi ikki lata tær sløku 16.000 krónurnar, sum hetta var mett at kosta fyrsta árið, og skotið verður upp at goyma málið til árið eftir. Tað verður gjørt, og nú kemur naggatóðn í. Í 1933 hendir einki annað enn at skúlanevndin ásannar, at einki nýtt er og eingir pengar eru. Málið verður nú goymt til næsta ár. Í 1934 fer tað aftur í nevnd og verður goymt eitt ár aftrat. Í 1935 enn eina ferð goymt til næsta ár. Í 1936 hendir so aftur nakað. Tú skjýtur skúlanevndin upp, at latið verður vinnunevndini upp í hendur at samráðast við Thomas Nygaard, ið tá var lærari við realskúlan í Havn, og kanska eisini við onnur, sum kundu geva leiðbeiningar, og at hon so skuldi leggja málið aftur fyri tingið árið eftir. Hetta uppskotið fekk sum øll uppskotini hini árini

sinnaðan hartil, og Djurhuus vildi mæla til at styðja málið, men kundi ikki garantera fyri, at løgtingið vildi veita allan peningin. Eg tók so ta støðu fyri egna rokning at fáa skeiðið í lag, av tí at eg kundi rokna við, at løgtingið antin vildi ganga við til at gjalda allar útreiðslurnar ella í hvørt tilfelli ein stóran part, og restin rokni eg so fæst til vegar privat.

. . . . . .

Eg loyvi mær nú at biðja løgtingið taka við hesum studentaskeið, soleiðis at tað verður fyri rokning tingsins.

. . . . . .

Eg mæli til, at tingið longu nú søkir um at fáa skeiðið góðkent og tingar við Havnar býráð um at veita studning til dømis til hita og ljós.«

Seinni um heystið legði skúlanevndin fram álit í málinum og setti uppskot fram í 5 pørtum til atkvøðu: 1) tingið góðkennir stovnaða skeiðið, 2) letur tann neyðuga peningin, 3) letur landsnevdnina saman við lærarunum fáa heimild til at avgera, hvussu skipað skal verða frá 1. september 1938, 4) landsnevndin fær heimild til at søkja ríkisstýrið um at fáa skeiðið góðkent og at samráðast við Havnar býráð um studning, 5) landsnevndin fær heimild til at skipa fyri skeiðinum millum tingseturnar og skal geva tinginum frágreiðing til næstu tingsetu um skúlans virki. 11. december samtyktu allir flokkar uppskotið; av 24 tingmonnum atkvøddu 22 fyri, og eingin var ímóti.

Í 1938 legði skúlanevndin fram álit, har greitt verður frá teimum samtyktum, sum landsnevndin hevur tikið í teimum málum, sum henni vóru litin upp í hendur í 1937. Sagt verður eisini frá, at nevndin hevur fingið uppskot frá stjóranum fyri nýggja studentaskeiðinum, Thomas Nygaard, um eina felagsskipan fyri preliminerskeiðið, studentanskúlan og læraraskúlan í samband við kostskúla; men nevndin hevur ikki kunnað tikið støðu til hetta uppskotið, av tí at undirvísingarministarin eisini hevur boðað frá einum uppskoti; men tað er ikki komið enn.

Av hesum sæst, at skeiðið bert var ætlað at vera fyribilsskipan, og at ætlanirnar um studentaskúla (gymnasium) sostatt ikki vóru sleptar. Tá einki er nevnt um læraraskúlan í sambandi við studentaskeiðið hesi árini, er tað av tí, at tað alla





tíðina hevði verið ætlanin, at henda samskiping millum skúlarnar skuldi gerast, tá ið studenta*skúli* var komin.

### 5. *Nýggjar ætlanir um studentaskúla*

Sum nevnt komu nú tvey nýggj uppskot um skipan av hægra skúlanum í Føroyum, og bæði uppskotini høvdu sum mið samskiping av læraraskúlanum og studentaskúlanum. Eingin serlig grund er at steðga serliga við ríkisuppskotið. Innihaldið av tí var, at í Føroyum skuldi setast á stovn gymnasium og seminarium undir einum, men bæði skipað so, sum hesir skúlar eru skipaðir í Danmark, tó sjálvsagt við teimum broytingum, sum føroysk viðurskifti krevja. Ikki var semja á tingi um hetta uppskot. Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin mæltu til at góðtaka tað, meðan sjálvstýrisflokkarnir (Gamla sjálvstýrið og Fólkaflokkurin) mæltu til at goyma tað, til tingið hevði fingið at vita meira um byggiætlanirnar. Tað var á eykatingsetu í mars 1940, at málið var fyri, og eftir uppskotinum hjá sjálvstýrisflokkunum skuldi tað koma fyri aftur á ólavsøkutingi; men tá var heimsbardagin byrjaður, og so datt hetta niðurfyri. Vit kunnu spyrja, hvussu tað ber til, at uppskot um tílíkan skúla kundi koma frá undirvísingarministeriinum nú, tá ið sama ministerium 8 ár frammanundan hevði sagt bart út nei at seta studentaskúla á stovn í Føroyum. Tað er eingin ivi um, at »Undervisningsinspektøren for Gymnasieskolerne«, *Højberg Christensen*, hevur høvuðsæruna av hesum. Hann var góður stuðul hjá teimum monnum, sum arbeiddu fyri studentaskeiðinum í Føroyum, og hann var her í 1939. Hann man ivaleyst hava kent seg vissan í, at tað bar til at hava studentaskúla í Føroyum, og niðurafturkomin hevur hann so gjørt sítt til, at hetta uppskot varð sent tinginum til ummælis.

Uppskotið hjá Thomas Nygaard kom ongantíð rættuliga fyri, kanska helst av krígnum; men tað var ómetaliga áhugavert, og tað er — helst — spell, at hægri skúlaskapur okkara ikki er skipaður eftir tí. Uppskotið var gjørt út frá føroyskum viðurskiftum — við tí í huga, at vit eru so fáment, at vit aldri kunnu fáa góðar hægri skúlar í Føroyum uttan so, at vit samskipa henda skúlaskap. Høvuðstátturin í hesum uppskoti var hesin: grundin skuldi vera ein fyrireikingarskúli, preliminer-

skúli, upp á tvey ár, sum skuldi vera felags fyri læraraskúlanæmingar og studentaskúlanæmingar. Tá ið henda skúlagongd var liðug, skuldu næmingarnir skiljast: studentarnir fyri seg og læraraskúlanæmingarnir fyri seg. Men teir skuldu framvegis hava tímar saman, til dømis í søgu, føroyskum og donskum, og annars í teimum lærugreinum, har tað var natúrligt. Hetta hevði eisini havt tann fyrimun — soleiðis var ætlanin — at um ein studentur fekk hug at lesa til lærara, kundi hann lættliga lisið tað aftrat, sum kravdist til læraraprógv og umvent. Men sum sagt, hetta uppskotið varð tagt burtur.

Í stríðsárunum hendi einki. Tá var so mangt annað at hugsa um, og tað var ikki so umráðandi at fáa skúla í bráðskundi, tí studentaskeiðið var jú í gongd alla tíðina, og enntá var skipað soleiðis fyri, at ungir studentar kundu lesa ávegis til embætisprógv í Føroyum, og hetta styðjaði tingið eisini við at lata studning til hesa undirvísing. Í 1946 verður málið tikið fram aftur; men so komu samráðingarnar um føroysku stjórnarviðurskiftini, sum endaðu við heimastýrislógini í 1948, og tí varð avgjørt á tingi at goyma málið, til hesar samráðingar vóru lidnar. Tó vórðu í 1947 og 1948 settar 300.000 krónur av hvørt árið til bygging av hægri skúla við kostdeild.

Tá ið landsstýrið var sett á stovn við heimastýrisskipanini, verður latið tí upp í hendur at fyrireika byggingina av skúlanum. Nevnd verður sett at kanna málið, og í henni komu at sita Chr. Lützen, stjóri fyri real- og læraraskúlanum, Thomas Nygaard, stjóri fyri studentaskúlanum, og Edw. Mitens, skrivstovustjóri í landsstýrinum. Drúgt álit kom frá hesari nevnd í 1950. Uppskotið frá nevndini inniheldur ikki nakað serligt av nýggjum í mun til ríkisuppskotið í 1939 uttan tað, at hægri skúlaskapurin heilt skal skipast saman soleiðis, at realskúlin, læraraskúlin og studentaskúlin skulu vera ein stovnur, sum skal rekast av løgtinginum og ríkinum í felagsskapi. Nýtt er eisini, at landsstýrið skal avgera, hvar skúlin skal vera. Av tí at hesir tríggir skúlarnir skuldu skipast saman, var ætlanin at byggja skúlahús har, sum realskúlin er. Men Havnin skuldi eisini undir at byggja kommunuskúla niðan fyri viðalundina. Nú skjýtur Thomas Nygaard upp, at landsstýrið skal skifta um við by-

ráðið, soleiðis at kommunuskúlin verður bygdur á realskúlaøkinum, har hann kemur at liggja betur fyri enn so langt uppi í býnum sum við viðalundina. Og av tí at hægri skúlin skal hava kostdeild, liggur betur fyri at hava hann eitt sindur burtur frá býarkjarnuni — uppi við viðalundina. Kommunuskúlin var — eitt sindur seinni — bygdur á realskúlaøkinum, men studentaskúlin datt burtur eina ferð enn, og ikki fyrr enn á vetrartingi 1957 kemur málið fram aftur av álvara. Hesa ferð er tað P. M. Dam, sum við álvarsomum orðum leggur málið fyri tingið — serliga er tað kostdeildina, hann leggur dentin á — hesin spurningur má loysast nú, og samfelagið skipar bert rættvíst fyri, »um atkoman til lærdóms og allan skúlaskap ikki er treytað av peningapunginum, men einans av evnunum, sum búgva í barninum.«

Tá ið sagt varð, at málið ikki kom framaftur fyrr enn nú, er tað ikki heilt beint, tí at landsstýrið hevði kortini arbeitt við tí. Men eingin ivi er um, at tað at málið varð lagt fyri tingið aftur, hevur skundað undir fyrireikingarnar. Nevndin, sum hevur skúlaspurningin um hendur, leggur í einum áliti á hesi somu tingsetu fleiri møguleikar fyri tingið um, hvar skúlin skal vera, og hevur eisini tekningar til hansara. Ein tekning er frá landsverkfrøðingsskrivstovuni, ein frá Th. Havning, arkitekti, og ein frá Nils Ihlen. Møguleikarnir, sum nevndin serliga er sinnað at fáa útint, eru hesir: 1) at byggja skúlan eftir tekning frá landsverkfrøðingsskrivstovuni sunnan fyri viðalundina, soleiðis at skúlahúsini verða bygd vestan fyri ánna, og kostdeildin eystanfyri, 2) at byggja skúlan eftir somu tekning uppi í Hoydølum og brúka bróstsjúkrahúsið til kostdeild, 3) at brúka bróstsjúkrahúsið til skúla við teimum broytingum, sum tørva. Tingið samtykkir at biðja landsstýrið kanna teir møguleikar, sum nevndir eru í álitinum.

Á tingi gjørdist eitt ómetaligt kjak um, hvar ið studentaskúlin skuldi vera. Ikki varð spurningurin loystur, fyrr enn landsstýrið fekk heimild til at avgera henda spurning. Áhugavert kundi verið at viðgjørt hetta kjak gjølla, men pláss er ikki til tað á hesum stað. Í 1959 legði Niels Winther Poulsen fram uppskot um avogning av lendi til skúlan; hetta varð tó uppgivið, men Niels Winther Poulsen gavst ikki við hesum máli, og hann man

eiga stóran part av æruni fyri, at farið varð undir at byggja skúla upp í Hoydølum í 1961 eftir tekning frá Olaf Mortensen, arkitekti. Men ikki var hetta serliga væl umtókt. Uppskot kom til tingið, aftaná at farið var undir byggingina, um at steðga hesum arbeiði; men tað var ikki gjørt, og nú er komið so langt áleiðis, at væntuliga kunnu húsini takast í brúk einaferð í skúlaárinum 1964-65.

### 6. *Húsaviðurskiftini hjá studentaskúlanum*

Endiliga er húsaspurningurin loystur. Í 25 ár var studentaskúlin húsvillur; men tvær vikur, áðrenn hann fylti fjórðingsøld, kundi hann seta fótin undir egið borð, sum onkur tók til á einum lítlum hátíðarhaldi 25 ára føðingardagin 1. september 1962. Tey fyrstu 10 árini leigaði studentaskúlin skúlastovur frá realskúlanum seinnapartin á degi. Hetta var ógvuliga tvørligt, og í 1946 fekk skúlin lænt hús frá býráðnum úti á VBV, sum vóru alt ov smá og óhóskandi í allar mátar. Tá ið matematiska deildin kom í 1947, vórðu eini hús bygd á sama grundøki sum VBV til fysikklaboratorium og til bústað hjá fyristøðumanninum. Seinast í 50-unum fekk skúlin leigað eina barakk aftrat frá býráðnum tætt við skúlan; men ólagaligt var at hava skúla í trimum støðum.

Við byrjan av skúlaárinum 1962-63 varð so flutt niðan til Hoydalar. »Gamla hús« verður nú nýtt til skúla. Har eru 10 vanligar skúlastovur, ein stova til natúrfrøði, ein til fysikk, ein til kemi og ein sangstova, ein lærarastova og ein skrivstova til rektor. Nýggi skúlin er komin so mikið ávegis, at tvær stovur hava verið brúktar í hesum skúlaári. Samstundis sum flutt var niðan til Hoydalar, varð kostdeild sett á stovn, har 25 dreingir búgva. Kostdeildin er í »Nýggja húsi«, har fyristøðumaðurin fyri deildini eisini býr. Køkurin og matarhøllin til kostdeildina eru tó í »Gamla húsi«.

### 7. *Eitt sindur um skúlan hesi 27 árini*

Skúlin byrjaði í 1937 sum 2-ára preliminerskeið. Henda skipan varði til 1959, tá ið umlagt varð til 3-ára realdeild og 3-ára studentadeild. Tey fyrstu 10 árini var bert nýmálslig

studentadeild; men í 1947 kom matematisk deild aftrat. Løgtingið ber allan kostnaðin av skúlanum og letur eisini studning til næmingarnar. Tey fyrstu um leið 20 árini skuldi hvør næmingur lata 200 krónur um árið fyri skúlagongdina, og tann studningur, sum fekst, var sjáldan meir enn hesar 200 krónurnar. Nú er skúlagongdin ókeypis. Eisini letur løgtingið studning til kostdeildina, har kostnæmingarnir í løtuni gjalda 1950 krónur um árið. Nú kunnu næmingarnir eisini fáa studning frá »Ungdommens uddannelsesfond«.

Umsitingina av skúlanum hevur landsstýrið; men tó hevur skúlin alla tíðina fylgt teimum krøvum, sum eru galdandi fyri donsk preliminer- og studentaskeið, nú real- og studentaskúlar, tó við føroyskum sum serlærugrein. Eisini hava lærararnir fyri tað mesta verið løntir sum danskir studentaskúlalærarar.

Um skúlaskipanina er tað at siga, at smáar broytingar eru gjørdar, við tað at eisini føroyskt er lærugrein í skúlanum. Hetta hevur ført við sær, at væl minni verður lisið í donskum, svenskum og norskum enn á donskum skúlum. Í landalæru og natúrsøgu eru krøvini lagað eftir føroyskum viðurskiftum.

Próvdómarar til studentaprógv hava verið lærarar við danskar studentaskúlar, av tí at bert lærarar, ið hava skúlaembætisprógv (cand. mag.ar) og hava ført næmingar upp til studentaprógv sjálvir, vanliga kunnu góðkennast sum próvdómarar. Í stríðsárunum bar sjálvsagt ikki til at fáa próvdómarar úr Danmark, og heldur ikki kundu næmingarnir her fáa somu uppgávur sum danskir næmingar. Hesi árini vórðu so uppgávurnar gjørdar í Føroyum, og ymsir menn, sum skil høvdu á skúlaskapi, vóru próvdómarar. Tá ið kríggið var av, vórðu allar próvtøkurnar góðkendar.

Skúlin byrjaði fyrsta skúlaár sítt við 18 næmingum, 15 í studentaflokkinum og 3 í preliminerflokkinum, annað skúlaárið 1938-39 vóru 30 næmingar; við byrjan av skúlaárinum 1963-64 vóru 220 næmingar. Í 1939 fingu fyrstu studentarnir prógv, teir vóru 7 í tali (nøvnini eru aðrastaðni í hesum bóklingi), og fyra fingu preliminerprógv.

Mangt annað kundi verið trivið í av studentaskúlasøguni. Her er so ein parturin viðgjørdur, og hetta gjørdist meira søgan

# Sanatoriið í Hoydølum




*Breidal foto*
*1935*

um studentaskúlamálið enn um sjálvan skúlan. Men vónandi verða líkindi til eitt annað ár at viðgera söguna um tey meira "skúlaligu" viðurskiftini.

P.M.Rasmussen.

ÍSKOYTI TIL YVIRLIT YVIR STUDENTASKÚLASÖGUNA

Aftaná at hava húsast í "Gamla húsi" síðan 1962 varð so við og við flutt yvir í tann nýggja skúlan, fyrst vórðu 2 stovur hartiknar í nýtslu, síðan 2 afturat, og í 1965 varð tann nýggi skúlin av álvára tikin í nýtslu, meðan "Gamla hús" varð innrættað til næmingabústað fyri 45 dreingir; "Nýggja hús", ið kann hýsa 20 næmingum, gjördist næmingabústaður fyri gentur.

Næmingatalið er ökt nógv hesi seinru árini. Meðan uml. 200 næmingar vóru í 1962, vóru uml. 400 við skúlaársbyrjan 1974/75. Til 1968 hövdu verið 1 matematiskur og 1 nýmálsligur flokkur á hvörjum stigi (íalt 6 studentaflokkar) umframt 2 realflokkar á hvörjum stigi (íalt 6 realflokkar). Í 1968 gjördist neyðugt at hava 2 matematiskar flokkar í 1g, og síðan 1971 hava á henda hátt verið 2 matematiskir studentaflokkar á hvörjum stigi. Á sama hátt gjördist í 1972 neyðugt at fara undir 2 nýmálsligar flokkar í 1g, soleiðis at nú eru 12 studentaflokkar.

Hetta árið, 1972, varð farið undir nýggja undirvísingargrein aftrat teimum gomlu matematiskt/fysisku og nýmálsligu, hetta var samfelagsgreinin. Sum nevnt í öðrum sambandi ganga allir næmingar saman í 1g mat. ella ným., men aftan á 1g gjördist nú hövi at velja, um ein vildi lesa til mat/fysiskt, mat/samfelagsligt, nýmálsligt ella málsligt/samfelagsfakligt studentsprógv. Í 1974 vórðu á fyrsta sinni prógv tikin eftir hesi skipanini. Í 1973 kom uppaftur ein nýggj grein, tann mat/natúrfröðisliga, og í ár taka tey fyrstu prógv á hesi greinini. (Sí annars strikumynd aðrastaðni deildum og greinum viðvíkjandi).

Tað seinasta, ið undirvísingarliga er hent í Hoydölum, er, at í 1974 varð HF-skeið sett á stovn, við tveimum flokkum umframt tveimum uttanbíggjardeildum, onnur í Klaksvík, hin í Suðuroy. Um somu tíð er realdeildin um at verða niðurlögd; í 1973 varð seinasti realflokkurin tikin inn, og verður realpróvtöka her á seinasta sinni í 1976.

Arnbjörn Mortensen

# FYRRVERANDI LÆRARAR

(teir, sum eru, standa aðrastaðni)

Eitt yvirlit yvir teir lærarar, sum hava undirvíst í teimum ymisku lærugreinunum, síðan skúlin byrjaði í 1937 (mat. deildin byrjaði í 1947). Umframt söguligan áhuga fekk hetta yvirlit týdning, tá næmingafelagið og lærararáðið kravdu, at próvdómararnir skuldu skilja föroyskt.

## SÖGA

| | |
|---|---|
| 1937 - 38 | eingin sögulærari, Chr. Haraldsen undirvísti |
| 1938 | c.m. Carl Wassmann (+latín), mátti gevast vegna sjúku |
| 1938 - 47 | c.m. Niels Ladegaard Petersen (+ latín) |
| 1947 - 51 | heldur eingin sögulærari, Anton Petersen undirvísti |
| 1951 - 54 | c.m. Jens Ole Pedersen |

## LÍVFRÖÐI OG GEOGRAFI

| | |
|---|---|
| 1937 - 38 | eingin faklærari, Erik Petersen undirvísti |
| 1938 - 46 | c.m. Jens E. Bergstedt |
| 1946 - 49 | c.m. Knud Jacobsen |
| 1949 - 55 | c.m. Uffe Danvig |
| 1955 | c.m. Jóannes Rasmussen |
| - 57 | c.m. Ole Nielung og c.m. Peter Bancke |
| 1957 - 58 | c.m. Poul Jensen |
| 1958 - 71 | c.m. Andreas Höjgaard |
| 1966 - 70 | c.m. Hans Holm |

## MÁLLÆRUGREINIR

| | |
|---|---|
| 1937 - 74 | c.m. Chr. Haraldsen, týskt og franskt |
| 1937 - 62 | c.m. Thomas Nygaard, eingilskt og týskt |
| 1947 - 58 | c.m. Anton Pedersen, franskt og latín |
| 1956 | c.m. Else Reinecker, vikar fyri Chr. Haraldsen |
| 1959 - 64 | c.m. Sofus Joensen, danskt |
| 1964 - 74 | c.m. Daniella Olsen, eingilskt og týskt |
| 1962 - 67 | c.m. Poul Skårup, franskt og latín |
| 1963 - 64 | sem. Eyðun Winther, danskt |
| 1966 - 67 | stud.mag. Svend Espegaard, vikarur í donskum f/ Erik Petersen |
| 1970 - 71 | stud.mag. Jörgen Jörgensen, danskt |
| 1967 - 68<br>1971 - 72 | Faklær. Ebba Rosenberg, franskt |
| 1969 - 71 | stud.mag. Ole Förland, franskt og latín |
| 1971 - 73 | stud.mag. Gunver Gammelgaard, danskt |
| 1972 - 73 | c.m. Morten J. Rasmussen, týskt og franskt |
| 1972 - 73 | stud.mag. Nanna Roe Nissen, latín |
| 1973 - 74 | stud.mag. Bergliót Kristjansdóttir, latín |
| 1973 - 74 | c.m. Martin Horsted, enskt, týskt og franskt |

## MATEMATIKK OG FYSIKK

| | |
|---|---|
| 1937 - 39<br>1958 - 65 | Chr. Lützen |
| 1939 - 46 | Bergstedt matematikk á málsligu deild |
| 1947 - 49 | c.m. Bjarner Svejgaard |
| 1949 - 55 | c.m. Sven Högstedt |
| 1955 - 58 | c. polyt Páll Mikkelsen |
| 1958 - 59 | c.m. Chr. Dumstrej |
| 1960 - 62 | c.polyt Poul K. Bærentsen |
| 1962 - 70 | c.polyt Magnus Simonsen |
| 1968 | c.sc. Andur Pedersen, vikarur fyri J. í Gerðinum |
| 1969 - 72 | c.m. Peder Hedebol Nielsen |
| 1970 - 72 | c.sc. Bogi Hansen |
| 1972 - 74 | c.sc. Poul E. Skakke |

## Prestar, sum hava undirvíst í RELIGIÓN OG LATÍN

| | |
|---|---|
| 1937 - 38 | Jákup Dahl |
| 1962 - 71<br>1974 - 75 | Petur M. Rasmussen |
| 1971 - 72<br>1974 - 75 | Kjartan Mörköre |
| 1967 | Palle Burla |
| 1968 - 71 | Jóhan Weihe |

## FIMLEIKUR

| | |
|---|---|
| 1961 - 64 | sem. Petur S. Rasmussen |
| 1963 - 66 | sem. Annika Niclasen |
| 1964 - 72 | sem. Jóannes Skaale |
| 1971 | Brynhild Mohr |

JG



# STUDENTARNIR 1939 - 73

*1939*

Ejvind Dahl, Arnóra Evensen, Julianna Hammer, Páll Jensen (á Dul), Sofus Joensen, Lena Nicolajsen, Johan Weihe.

*1940*

Niels Juel Faber Arge, Erling Ejdesgaard, Marner Andreas Simonsen.

*1941*

Sverre Fon, Kristian Sune Haraldsen.
Karl Müller Justinussen, Else Petersen, Aksel Wenningstedt Tórgarð.

*1942*

Daniel Jacob Bærentsen, Jonna Kristine Hansen, Demmus Hentze, Inga Juul, Daniel Magnussen, Arnbjørn Marne Mortensen, Eli Nolsøe, Mortan Vilhelm Nolsøe, Peter Petersen, Peter Arne Rein, Eyðun Sjúrður Winther, Poul Fritz Jacobsen.

*1943*

Eliesar Arge, Andreas Sofus Højgaard, Poul Joensen, Birthe Bargsteen Ludvigsen, Erik Bargsteen Ludvigsen, Sjúrður Nickels Lützen, Petur Arthur Reinert, Niels H. E. U. Westerby, Ulf Zachariasen, Kathrine Sekjær Nielsen, Johan Esmar Hansen.

*1944*

Peter Torkil Beder, Olavur Breiðá, Karl Johan Frits Hansen, Jens Peter W. Jensen, Jacob Johansen, Bjarni Lützen, Páll O. R. Poulsen, Una Maria Poulsen, Johannes Nicola Rubeksen.

*1945*

Inga Nanna Guðrun Djurhuus, Leivur Gregersen, Poul Sivert Joensen Lamhauge, Aage Michelsen, Niclas Johan Mikkelsen, Olav Hildibrand Olsen, Viggo Planck, Elinborg av Kák Rasmussen, Sverri Skaalum, Hjørdis Thomsen, Thomas Pauli Vestergaard.

Thomas Napoleon Djurhuus, Verner Leo Mogens Egholm, Hans L. Vang Hansen, Jørgen Hansen, Jona E. F. Henriksen, Johilda Fanny Joensen, Sofus G. K. Joensen, Eyðálvur Kristiansen, Anna Elisa Mortensen, Johan Christian Nielsen, Johan Andreas Nolsøe, Joen Arne Róin, Hans S. C. Thomsen.

*1947*

Lovisa A. A. S. S. Andreasen, H. J. Birgir Danielsen, Djóni í Geil, Lilly Lava Hansen, Maria J. S. Hansen, Óli Mikkelsen, Thórolvur Nolsøe, Elisabeth Margrethe Winther.

*1948*

Axel Valdemar Dalsgard, Róland Tórur Waag Høgnesen, William Holm Jacobsen, Poul N. M. Olsen, Sigrid Rubeksen, Eyðun Sørensen.

*1949*

Helena J. K. Arge, Elisabeth J. M. Z. Danielsen, Ólavur á Heygum Joensen (Hátún), Karin Helena Waag Lützen, Hans Nolsøe, Jørgrim F. Joensen Næs, Osla Arge, Haldor C. Christiansen, Hans Ólavur L. Danielsen, Gunvør Hansen, Arne Berg Jacobsen, Linjon S. H. Jacobsen, Johanne Lovise Jensen, Páll Mikkelsen, Peter Mohr, Olfert Fridtjof Hammer úr Skúoy, Ditlev H. E. Hammer, Kirsten Olsen, Hans Christoffer Thomasen.

*1950*

Ingibjørg Johannesen, Marjun Johannesen, Alexander Peter Sólstein, P. A. M. Sverre Egholm, Jacobina J. S. Joensen, Ásmundur Vágsheyg Johannesen, Sigvald H. M. Kristiansen, Byrgi Petersen, Magnus Ólavur Simonsen, Ellen Kristine Weihe.

*1951*

Asa Jensen, Karen Margretha Joensen, Kjartan Juhl Mørkøre, Ejvind Hansen, Oddfríður Haraldsen, Anna Jakoba Jacobsen, Gunna Danielsen, Andreas Lava Olsen, Torbjørn Poulsen, Erling Simonsen, Esther L. M. Thomsen.

Joen Henry Andreasen, Jens Pauli Heinesen, Jóhan Hendrik Winther Poulsen, Peter Martin Rasmussen, Jacob Bærentsen, Tórmóður Djurhuus, Einar Kallsberg, Margretha Mohr, Jákup Dahl Olsen, Andreas Jessen Reinert, Steingrim Jónas Weihe, Absalon Djurhuus.

*1953*

Kirsten Bech, Sigrun G. Danielsen, Jóhanna S. Davidsen, Johanne Karoline Mortensen, Jona Augusta Nielsen, Hilma Viðstein, Christian Benedikt Davidsen, Ole Jacob Hansen, Marita Arge Magnussen, Anfinnur Mikkelsen, Poul Olsen, Petur Sigurd Hentze Rasmussen, Jørmund Reinert, Andreas Marius Thomasen, Marjun Weihe.

*1954*

Maud E. P. Brimheim, Maria J. M. Olsen, Rachel F. Sivertsen, Ólavur Clementsen, Ólavur Gaard, Sólbjørn Jacobsen, Jóannes Pætur Petersen, Kári Dalsgaard Petersen, Elsebeth Maria K. Sivertsen, Regin Thomsen.

*1955*

Signar P. Dam, Ása Bjørgheim Joensen, Kristianna B. M. S. Nordendal, Edmund Friman Símunarson, Trygvi Finnbjørn Askham, Heri Berg, Jakob Egholm í Gerðinum, Dann Mortensen, Heðin Samuelsen, Halgir J. B. Vestergaard.

*1956*

Johannes M. H. Johansen, Áshild M. Olsen, Annfinnur Zachariassen, Sonja Dahl, Ejvind Vøgg Guttesen, Niels Heri Jensen, Peter Poulsen, Hanus A. Samuelsen.

*1957*

Randi Djurhuus, Jensa K. Egholm, Jóhanna T. Kallsberg, Karen Nonnegaard-Petersen, Jón á Steig, Arne Edmund Thorstensen, Peter P. Dahl, Kári Peter Holm, Jógvan J. S. M. Joensen, Martin Arne Emil Ludvig, Jógvan Nolsoe, Halgir Winther Poulsen, Hans Peter Weihe.

*1958*

Unnur í Dali, Anna Egholm, Ása Højgaard Ellefsen, Marjun Hansen, Sólrun Bergljót Ludvig, Ragnheiður Petersen, Zacharias F. Wang, Andor Elias Ellefsen, Einar Ellingsgaard, Hans Jacob D. D. Joensen, Marita Johanesen, Fróði Lassen, Jógvan M. Matras, Krisjan Joannes Olsen, Randi Petersen, Heri Smith, Virgar T. Dalsgaard.

Bjarne Bæk, Joen Anfinnur O. Durhuus, Maria Vágsheyg Johannesen, Juliana Klett, Jens Christian Knudsen, Daphne Mittún, Odmar Niclasen, Marjun Olsen, Marie Poulsen, Svenn Brimheim, Hans Danielsen, Heini Davidsen, Vilgerð Hansen, Any Joensen, Kjartan L. Kristiansen, Magnus Pauli Magnussen, Anfin V. R. Nielsen, Arnbjørn A. Thomsen.

*1960*

Jórun Abrahamsen, Hanus Andreasen, Turið Paula Christiansen, Jóanes á Mølini Dalsgaard, J. J. F. Georg Egholm, Jóan Petur Gregoriussen, Oddvør S. K. Hovgaard, Elin Súsanna Jacobsen, Lív A. S. S. Joensen, Páll Johansen, Maria E. Krossteig, André L. P. Niclasen, Sigga Poulsen, Lars K. F. Reimers, Karen Stærmose, Anna Jóhanna Thomsen, Johan Nielsen, Barbara Thomsen, Óluva Absalonsen, Óli Sofus Bech, Jóhanna Margretha Matras í Buð, Jákup Magnus Danielsen, Bjarni Hansen, Ole Edvard Hejnesen, Anna Turið Holm, Øssur Dam Jacobsen, Sofus Joensen, Magni Lómstein, Árni Olafsson, Odmar Færø Olsen, Eyvind Mortan Veihe.

*1962*

Elsa Arge, Hans Jacob Debes, Olga Hammershaimb Debes, Borgný Djurhuus, Hjørdis Egholm, Elsa P. J. B. Funding, Leon P. K. Hansen, Elin Katrina Hentze, Pól J. F. í Horni, Gestur H. við Høgadalsá, Elin Mathilda Johansen, Poul J. P. Johansen, Hilda Susanna Larsen, Gertrud Mortensen, Jórun Lava Olsen, Samuel Andreas Weihe, Solveig M. E. E. Bjørk, Karl Johan Fosaa, Rolf Flemming Guttesen, Janus Sofus Hansen, Páll Sjúrður Hansen, Jógvan Andrias Henriksen, Bárður Jacobsen, Jens C. V. Jensen, Herdis Joensen, Poul Jensen, Erling Johannesen, Kaj Sune Kallsberg, Carl Mikkelsen, Gunnar H. D. Mørkøre, Carl Johan Nielsen, Ólavur Emil Olsen, Petur Friman Zachariasen.

1963

Árni Absalonsen, Alice Bærentsen, Anna Dal- Christiansen, Verner Hansen, Karsten Holm, Finnbogi Isaksen, Karin Kjölbro, Anna Marie Persson, Annfinnur Skaale, Jákup Thorsteinson, Anders Harboe-Ree, Johannes Houmann, Hjalti í Jákupsstovu, Hans Andreas Matras Joensen Joen Dalberg Joensen, Tórkil Skála, Hans Peter Weihe.

1964

Hanna Absalonsen, Eyðun Andreasen, Eyðbjörg Bertelsen, Jegvan Bæk, Kristianna Eliasen, Erik Haraldsen, Hjördis Höjgaard, Jógvan Kristin Joensen, Turið Joensen, Kaj Larsen, Jógvan Thomas Poulsen, Símun av Skarði, Hanus Sörensen, Per Thomsen, Jón Waagstein, Martin Eliasen, Ivy Guttesen, Bogi Hansen, Kári Helmsdal, Tórstein Holm, Hervör Isaksen, Bjarni Johannesen, Jórun Johansen, Sverri Lamhauge, Steintór Larsen, Elin Mortensen, Arne Poulsen, Kristian Rasmussen.

1965

Helena Andreasen, Sonja Arge,Karin Djurhuus, Tordis Helmsdal, Daniel Hofgaard, Erla Höjgaard, Julianna Jacobsen, Bergtóra Jensen, Margreta Joensen, Aase Mortensen, Brynhild Næss Sörensen, Ben Ole Carlsen, Tollakur Djurhuus, Kristian Djurhuus, Jógvan á Dul, Anna Gretha Frandsen, Fróði Helmsdal, Jósup Henriksen, Birta Jacobsen, Finnur Jacobsen, Hervör Lützen, Magnus Olsen, Tummas Olsen, Jaspur Petersen, Petur Martin Petersen, Eyðfinn Reinert, Hugin Samuelsen, Edmund Simonsen, Regin av Steinum, Mads Andrias Winther.

1966

Jógvan Arge, Jórun Arge, Jóna Guttesen, Hans Jákup Hermansen, Martin Restorff Jacobsen, Rólant Dam Jacobsen, Jógvan Joensen, Thomina Lauritsen, Devi Olsen, Bente Thomsen, Torkil Juul Thomsen, Justinus Eliasen, Magnus Pauli Gaard, Jens Petur Gaard, Eyðfinnur Hansen, Egil Helmsdal, Árni Jacobsen, Högni Joensen, Óluva Joensen, Heðin Johannesen, Johannes Mortensen, Niels Arni Nielsen, Ólrunn Olsen, Johan Petersen, Jóan Pauli Poulsen, Marius Rasmussen, Christina av Reyni, Hálvdan Simonsen.

1967

Óli Breckmann, Eivind Dalsgarð, Kári Davidsen, Jákup Egholm, Hansina Husgaard, Arnhold Joensen, Marita Johannesen, Annika Johansen, Pauli Mortensen, Sunrid Olsen, Beate Samuelsen, Róland í Skorini, Marjun Zachariasen, Poul Martin Berthelen, Absalon í Buð, Danial Petur Dam, Bogi Davidsen, Súni Ellingsgaard, Martin Fjallstein, Julia Fonsdal, Marner Gaard, Ása Hansen, Hilmar Jacobsen, Hilmar Joensen, Martin Erik Leo, Jákup Petersen, Sigurd Poulsen, Óli Reinert, Hans Pauli Ström, Trygvi Vestergaard, Jens Kári Vilhelm, Bjarni Vilhelm.

1968

Poul Andreasen, Símun Arge, Hildur Bendtsen, Turið Dahl, Peddy Davidsen, Gunnvör Godtfred, Ejvind Gærdbo, Levi Hentze, Rannvá Jensen, Andrew Magnussen, Jóhan Mortensen, Albert Mortensen, Marita Næss, Astrid Olsen, Karin Olsen, Elsa Birgitta Petersen, Heri Simonsen, Bjarni Sörensen, Birgir Arge, Finn Christiansen, Jóhan Hendrik Dahl, Jens Marius Dalsgaard, Högni Djurhuus, Heðin Follend, Magni í Horni, Henning Jacobsen, Óli Jacobsen, Pól Jespersen, Eyðbjörn Joensen, Ásmund Lamhauge, Petur Alberg Lamhauge, Axel Nolsöe, Daniel Eli Olsen, Kári Olsen, Páll Olsen, Andreas Petersen, Árni Rein, Hjalti Samuelsen, Bogi á Steig, Hans Arni Thorsteinsson, August Vang.

1969

Steingrim Abrahamsen, Elsa Absalonsen, Jóngerð Berthelsen, Edvör H
sen, Hans Edvard Hansen, Turið Debes Hentze, Ann Hovland, Johan He
rik Jacobsen, Janus Jensen, Heri Kragesteen, Oddbjörg Kristofferse
Rannvá Lindarstein, Durid Reinert, Sanna av Skarði, Haraldur Thoma
sen, Turið Winther, Andrias Ziska, Kaj Anthoniussen, Annika Bærent
Ólavur Christiansen, Jógvan Dahl, John Petur Danielsen, Elias Davi
sen, Hans Olav Hansen, Andrass Henriksen, Dánjal Petur Höjgaard, I
hard Jacobsen, Sigrun Joensen, Joen Pauli Johannesen, Jörgen Johan
sen, Símun Pauli úr Konoy, Hans Jacob Lamhauge, Niels Midjord, Emn
Mikkelsen, Jógvan Dahl Mikkelsen, Jákup Mörköre, Gundur Nybo, Berg
Olsen, Jóan Eyðfinnur Olsen, Jústinus Olsen, Janus Petersen, Jógva
Ravnsfjall, Jens Smith, Magnus á Stongum, Pál Weihe, Árni Winther

1970

Peter Alberg, Birgit Arge, Hanna Arge, Mai Breckmann, Súsanna Dan
sen, Eyðgerð Eliasen, Turið Hansen, Sólrun Johannesen, Randi Olser
Sæbjorn Olsen, Bergljót Petersen, Kári Petersen, Sigga Rasmussen,
Sevdal, Christian Wahl, Kári Öster, Helgi í Brekkunum, Kári Bæk, I
finnur Durhuus, Jóannes Eliasen, Ingi Helmsdal, Oddur Holm, Jógvan
Isaksen, Magnus Isaksen, Marjun Jacobsen, Helgi Joensen, Karin Joe
Bjarki Johannesen, Finnur Lützen, Edvard Olsen, Hans Jörgin Olsen
Klæmint OLsen, Eyðun Poulsen, Jón Rasmussen, Símun Simonsen, Zacha
Sörensen, Johan Thomsen, Elinborg Thorsteinsson.

1971

Helga Alberg, Gretha Christiansen, Katrin Dahl, Árni Gregersen, Ha
Heinesen, Jógvan Högnesen, LEna Jacobsen, Marita Jacobsen, Heri Ja
sen, Martin Jacobsen, Karin Jacobsen, Beinta í Jákupsstovu, Johann
Cathrina Joensen, Marna Fríðgerð Petersen, Odma Johannesen, Anna M
Svabo Jörgensen, Hans Arne Kristiansen, Johan Mortensen, Jan Mülle
Ninna Vilhelm Olsen, Poula Poulsen, Olav Schneider, Maja Schröter
Eyðun Simonsen, Solveig Sörensen, Eyðbjörg Thorleifsson, Sunnvá Ar
sen, Valborg Brattaberg, Högni Bærentsen, Marjun Dahl, Rakul Dam,
Petur Davidsen, Terje Davidsen, Fróði Debes, Heini Heinesen, Adelb
Jacobsen, Marita Jacobsen, Mortina Jacobsen, Selmar Jacobsen, Páll
Joen-Jacobsen, Jákup Eyðun Joensen, Sigga Maria Joensen, Kári Just
sen, Marjan Kass, Jón Lamhauge, Högni Larsen, Jákup Magnussen, Ask
Mortensen, Andrass Dahl Niclasen, Óla-Svenn Nolsöe, Gudfinn Olsen
gir Mortensen, Jógvan Martin Mörk, Eyðbjörn Rasmussen, Jákup Reine
Bjarni Samuelsen, Malan Simonsen, Nicolina Sörensen, Heðin Thomse
Tórmóður Thomsen, Jóannes Viderö, Jens Wilhelm,Magnus Magnussen.

1972

Hanna Breckmann, Ata Bærentsen, Súsanna Danielsen, Bjarta Höjgaard
Christian Ihlen, Marin Christina Jacobsen, Svanna Jensen, Jákup Fr
Larsen, Jóhan Mortensen, Elsba Olsen, Ove Olsen, Niclas Rasmussen,
Marita Tórsheim,Jógvan Bærentsen, Jórun Christophersen, Krisjan Ch
iansen, Annelin Dal-Christiansen, Oddmar Danielsen, Mikkjal Dánial
Johannes Hansen, Julius Holm, Tóri í Hoyvík, Líggjas Husgaard, Dán
Petur Höjgaard, Mannbjörn Jacobsen, Maria Jacobsen, Malan Joensen,
Napoleon Justinussen, Heðin Kambsdal, Kenni Kambsskarð, Sjúrður á
ini, Jóannes Mohr, John Reid Petersen, Jóhan Poulsen, Alix Rasmuss
Ivan Simonsen, Lena Simonsen, Sámal í Skorini, Jens Chr. Skålum, S
rid Thomsen, Kaj Vilhelmsen.

1973

Sigrid Arge, Britta Bendtsen, Eyðna Danialsson, Anna Hansen, Annemi Hansen, Bergljót Debes Hentze, Elisa Jacobsen, Marna Jacobsen, Martin Joensen, Annfinn Johansen, Jonhard Mikkelsen, Annika Nolsöe, Martin Næs, Katrin Næss, Ingun Winther Olsen, Jónsvein Poulsen, Kristie Samuelsen, Hanna Simonsen, Karl Johs. í Stórustovu, Ólavur í Beiti, Jákup Bærentsen, Eyðbjörg Davidsen, Hallur Ellingsgaard, Magni Follend, Jonna Hansen, Maria Hansen, Marianna Haraldsen, Finnur Helmsdal, Randi Jacobsen, Marjun Jensen, Helgi Joensen, Jógvan Joensen, Ólavur Joensen, Sörin Joensen, Kristianna Lamhauge, Högni Lützen, Mirian Midjord, Kári Mortensen, Árni Nicolajsen, Hans Peter Nielsen, Páll Nielsen, Randi Nolsöe, Bjarni Olsen, Bergur Poulsen, Kristian Rasmussen, Kolbein Simonsen, Eirikur Tausen, Frits Thomsen, Ísak Thomassen, Karin Zachariasen, Ingi Ellingsgaard.

# STUDENTATALIÐ

## 1939 - 74



# HVAR ERU STUDENTARNIR ?

Býtið av studentum frá FÖROYA STUDENTASKÚLA í tíðini 1939 - 1966 eftir útbúgvingarstað og núverandi (januar 1974) bústaði.

| I | II | III | IV | V |
|---|---|---|---|---|
| talið av pisum 357 (110,247) = 100% | til útlandið fóru 268 (81 , 187) | eru uttanlanda 136 (51 , 85) | við útbúgving 75 (25 , 50) | 21% |
| | | | lesa 38 ( 8 , 30) | 11% |
| | | | uttan útbúgv. 23 (18 , 5) | 6% |
| | | komin heim aftur 132 (30 ,102) | við útbúgving 122 (29 , 93) | 34% |
| | | | 10 (1,9) uttan útbúgv. | 3% |
| | verandi í Föroyum 78 (26 , 52) | | | 22% |
| | deyð 11(3 , 8) | | | 3% |

PZ&JG 1974

# HVAR ERU STUDENTARNIR ? (viðmerkingar)

Tað verður ofta sagt, at Föroya Studentaskúli (FS) eksporterar studentar. Fyri at kanna, hvussu stórur sannleiki er í hesum, blivu allir studentarnir frá FS í tíðini frá 1939-1966 skrásettir í arbeiðsvikuni, sum var í jan. 1974. Tá lestrartíðin til hægri útbúgving í miðal tekur 8 ár, gekk kanningin bert til 1966. (1966+8=1974).

Teigur I vísir samlaða talið av studentum. Í klombruni merkir fremra talið (110) kvinnuligar studentar, seinna talið mannligar. Hetta er eisini galdandi í hinum teigunum.

Teigur II vísir, hvussu nógv fóru til útlandið, hvussu nógv blivu verandi heima, og hvussu nógv eru deyð. Tey, sum blivu heima, fingu so gott sum öll eina ella aðra útbúgving, sum t.d. lærara-,skrivstovu-, sjúkrasystra- ella líknandi stutta útbúgving.

Teigur III vísir, hvussu nógv av teimum, sum fóru út, komu aftur, og hvussu nógv eru úti.

Teigur IV vísir, hvat tey gera, sum eru úti, og hvussu nógv komu aftur við útbúgving og uttan útbúgving. Við útbúgving meinast bæði stutta (t.d. laborantar, sjúkrasystrar,lærarar) og langar (t.d. læknar, verkfröðingar og cand. mag.ar)

Teigur V gevur tölini í %, roknað av samlaða studentatalinum.

JG



# Úr hvörjum stætti koma næmingarnir ?

SOCIALA BÝTIÐ Á STUDENTASKÚLANUM Í 1974

INNTÖKA YVIR/UNDIR KR. 40.000







I: Pensionistar
II: Starvs- ella tænastumenn
III: Arbeiðsmenn
IV: Fiskimenn incl. yvirmenn
V: Sjálvstøðug

í samfelagnum

í skúlanum

Ovara myndin vísir, hvussu inntøkubólkarnir yvir og undir 40.000 kr. (skattainntøka) eru umboðaðir í samfelag og skúla. Tað sæst, at næmingar við foreldrum, sum hava skattainntøku yvir 40.000 kr., eru 9 ferðir betri umboðaðir í skúla enn í samfelag.

Niðara myndin vísir, hvussu teir ymisku starvsbólkarnir eru umboðaðir í samfelag og skúla. Henda myndin vísir. at bólkarnir "starvs- og tænastumenn" og "sjálvstøðug" eru yvirumboðaðir í skúlanum.

~ sosiali bólkurin í arbeiðsvikuni ~

# ÚR HVØRJUM FÓLKASKÚLAFLOKKI KOMA NÆMINGARNIR Í STUDENTASKÚLAN?

| Tikin upp í 1.g | | 4M,4R el.2R | | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| Ár | Tal | Tal | % | |
| 1959 | 33 | 10 | 30 | 3ára stud.-og prel.skúli byrjar |
| 1960 | 19 | 6 | 32 | |
| 1961 | 33 | 21 | 64 | Fyrsti 2.prel. úr studentaskúlanum liðugur,men ongin næm. fer í 1.g |
| 1962 | 30 | 17 | 57 | 3 ára realskúli byrjar |
| 1963 | 30 | 12 | 40 | |
| 1964 | 32 | 10 | 31 | Fyrsti 2.real liðugur |
| 1965 | 41 | 9 | 22 | Seinasti 4M og 4R (svarar til 2r nú) |
| 1966 | 47 | 11 | 23 | Fyrsti næm. úr 2.real á bygd á FS. Til 1972koma bert 2-4 næm. av bygd úr 2.real. |
| 1967 | 44 | 9 | 21 | |
| 1968 | 63 | 12 | 19 | Tveir matematikkar flokkar |
| 1969 | 41 | 9 | 22 | |
| 1970 | 55 | 8 | 15 | |
| 1971 | 75 | 23 | 31 | |
| 1972 | 92 | 16 | 17 | Tveir málsligir flokkar |
| 1973 | 100 | 28 | 28 | |
| 1974 | 98 | 25 | 26 | |

Næmingarnir kunnu koma í 1.g úr 2.real (svarar til 4.millum(4M) 4.real (4R) áðrenn 1964). Sum tað sæst koma færri úr 2real nú enn úr 4M fyrr. Hetta skyldast millum annað, at 4M endaði við prógvi , meðan 2real bert er ein ársroynd, tó við statskontrolleraðum skrivligum karakterum.

JG



# MØTISKYLDA



## fyri studentaskulan

Næmingarnir hava mötiskyldu í öllum lærigreinum.

Fyri at fyribyrgja misröking av mötiskylduni eru fylgjandi reglur:

1. Fráverurnar verða uppgjördar í a)einstökum tímum
   b)einstökum dögum.

   Næmingurin skal siga umsitingarleiðaranum frá (ella á skrivstovuni), tá hann hevur verið burtur.
2. Fráverurnar verða gjördar upp hvörja viku, og fáa næmingarnir uppgerð yvir fráverurnar frá flokkslæraranum vikuna eftir.
3. 5 einstakir tímar = 1 dag.
4. Tá næmingur hevur verið u. 20% burtur frá undirvísingini, fær hann eina munnliga ávaring.
5. Verður eingin bati, fær næmingurin skrivliga ávaring, ið verður send foreldrunum í innskrivaðum brævi, um næmingurin er undir 18 ár, honum sjálvum, um hann er yvir 18 ár, og tá avrit av brævinum til foreldrini. Í hesi ávaring kemur at stand at um fráverurnar ikki halda uppat nú, verður boða frá til direktoratið fyri studentaskúlan og hf, ið síðan kemur at gera av, um næmingurin sleppur til prövtöku.
6. Lærararnir hava skyldu at föra protokollina hvönn tíma, og eingin næmingur má svíða fyri, at hetta ikki verður gjört.

Gjört verður vart við, at næmingur umframt mötiskyldu hevur skyldu at lata inn skrivlig arbeiði regluliga. Lærararnir í viðkomandi lærigreinum hava skyldu at ansa eftir, at skrivlig arbeiði verða latin inn regluliga.

Dömi

Tvey dömi um fráverur 8 fyrstu vikurnar í skúlaárinum.
8 vikur = 40 dagar. 20% av 40 dögum = 8 dagar.

A. Ein næmingur hevur verið sjúkur í 8 samanhangandi dagar. Hesin næmingur fær onga ávaring, tí lærararnir vita,hvussu nógv hesin næmingur hevur mist, og næmingurin hevur lætt við at vinna tað mista aftur.

B. Ein næmingur hevur verið burtur 3 ikki samanhangandi dagar og 25 einstakar tímar. Tilsamans 8 dagar (sí pkt.3). Hesin næmingur fær ávaring, tí lærararnir ómöguliga kunnu vita, hvat næmingurin hevur mist, og næmingurin hevur tí eisini ilt við at vinna aftur tað, ið mist er.

AM

# fyri hf

Mötiskyldan innan fyri HF er nakað tað sama sum fyri Studentaskúlan, men hon verður bert strangari hildin, tí at næmingar á HF altíð hava tann möguleika, at taka próvtökuna sum sjálvlesandi. Tað vil siga. at um ein næmingur forsömir undirvísingina so fer hann til próvtöku sum sjálvlesandi og skal so upp í öllum pensum, meðan tey. ið fylgja skeiðinum, ið summum fakum hava minni pensum og hava hövi til at fáa studning.

Reglurnar eru soleiðis, at minst 80% av undirvísingini skal fylgjast. Hetta er galdandi fyri alt skeiði, og eisini fyri tey einstöku fakini, soleiðis at ein næmingur ikki kann forsöma eitt einstakt fak uttan at verða koyrdur. Um 15% av skrivligum uppgávum ikki verða latnar inn, so hevur hin ávísi lærari skyldu at geva boð til rektarin um hetta. Um ein næmingur hevur eina umbering fyri ikki at möta upp, t.d. sjúku og tílíkt, so kunnu undantaksloyvi gevast, so at næmingurin sleppur at fylgja skeiðinum, men hann skal upp í fullum pensumi kortini. Um næmingurin forsömir ov nógv fær hann fyrst eina munnliga ávaring frá rektarinum, so eina skrivliga, um forsömingin ikki heldur uppat og so verður skriva til Direktoratið. Bæði rektarin og næmingurin senda eina frágreiðing um sakina og út frá hesum tekur Direktoratið stöðu til um næmingurin skal burturvísast.

Uppgerð fyri uppmöting verður gjörd frá fyrsta degi og gongur til skeiði er at enda tvey ár seinni.

DÖMI: Ein næmingur forsömir ov nógvar tímar í fyrstini. Hann fær boð (fyrstu ávaring) um hetta í oktober, men heldur áfram við at forsöma, og hann verður burturhýstur frá skeiðinum, men kann altíð taka próvtökuna sum sjálvl esandi.

DÖMI: Eitt konufólk verður upp á vegin, og má av hesum forsöma undirvísingina so nógv, at hon kemur upp um tey 20%. Hon sleppur at fylgja undirvísingini, men skal upp til próvtökuna í öllum pensum, men missur ikki studningin.

GH

# DAGBOK FYRI HF

13. august: Lærararáðsfundur. Ein lógarnevnd varð niðursett til at gera eina reglugerð fyri samskipan av HF-deildunum og öðrum.

21. august: HF byrjar í Suðuroy. Teir tveir fyrstu dagarnar var introduktiónsskeið hildið.

26. august: HF byrjar í Hoydölum.

27. august: Fundur í lógarnevndini um uppskot til reglugerð fyri HF.

28. august: Fundur í Landsstýrinum um uppskotið. Full semja var ikki.

29. august: Fundur í lógarnevndini um broyting av uppskotinum. Hetta uppskotið varð seinni samtykt.

31. august: HF í Klakksvík byrjar.

2. sept.: Introduktiónstími fyri HF í Hoydölum.

13. sept.: Lestrarvegleiðarar og næmingar í Hoydölum hövdu fund um uppskot til eitt næmingafelag fyri HF.

13. sept.: Plenum-fundur. Allir hjálærarar og stuðulslærarar lestrarvegleiðarar, umsitingarleiðarar og rektarin hövdu fund um skrá fyri ferðingar hjá stuðulslærarunum býti av stuðuls- og hjáundirvísing, lön og öðrum.

20.-22. sept.: HF í Klakksvík kom til Havnar har teir hittu HF-næmingar í Hoydölum. Síðani fóru teir og 3. real til Suðuroyar at hitta næmingarnar har. Gistu á gistingarhúsini í Öravík.

21. sept.: Geologisk ekskursión í Hvannhaga. Introduktiónsskeið um kvöldið.

22. sept.: Útferð til Sumbiar. Heim um kvöldið.

26. sept.: Fundur í Landsstýrinum um HF-reglugerð.

30.-31. okt.: Introduktiónsskeið fyri HF-næmingunum í Hoydölum.

13. nov.: Fundur í Academicum faeroensis um skúlaskap.

27. nov.: Gunnar Nielsen, skúlastjóri úr Danmark helt fyrilestur um alkohol fyri HF-næmingunum í Hoydölum.

28.-29. nov.: HF í Klakksvík kom til Havnar. Undirvísing í matematikk. týskum, laboratoriu-royndir í biologi og lestrarvegleiðing um tær ymisku valgreinirnar saman við HF-næmingum í Hoydölum.

9. des.: Fundur í Landsstýrinum við skúlastjörnini um HF-reglugerð.

16. des.: Hövuðsfundarhald í Havn.

Des.: HF í Klakksvík á biologi-ekskursión til Hvannasund.

19. des. : HF-lærarafundur um støðuna hjá næmingunum í Hoydølum.

11. jan. : Fundur í lógarnevnd, lestrarvegleiðarar og rektari um skrá fyri vitjan frá Direktoratinum.

15. jan. : Fundur millum lestrarvegleiðarar og HF-næmingar um uppskot til Direktoratið.

20.-24. jan.: Undirvísingarinspektørur fyri HF, Jørgen Olse í Føroyum.

28. jan. : Arbeiðsfundur um upptøku av nyggjum næmingum. Gjørt umsóknarblöð, lýsing til útvarp og blöð og ein bókling.

11.-14. febr.: HF í Suðuroy í Havn. Gisti á Háskúlanum. Undirvísing í matematikk og týskum. Felagstími í biologi og psykologi um alkohol. Fundir við HF-næmingarnar í Havn og lestrarvegleiðararnar..

14. febr. : Lestrarvegleiðara-fundur í Havn.

20. febr. : Almennur fundur á Fróðskaparsetrinum um Studentaskúlan og HF.

3.-5. mars: Fundur í Danmark fyri lestrarvegleiðarar.

18. mars : HF-næmingar í Hoydølum hövdu felagstíma um at gera eina ferð til Suðuroyar.

18. mars : Fundur í lógarnevndini um reglugerð fyri HF.

Mars : HF-næmingar í Suðuroy stíla fyri einum almennum fundi um nakotika og alkohol saman við lærarunum í psykologi.

3.-6. apríl: HF í Klakksvík og Hoydølum í Suðri. Undirvísing í studieteknikk tann eina dagin.

3.-5. apríl: Lestrarvegleiðara-fundur í Suðuroy.

12. apríl: Fundur í Landsstýrinum um reglugerð fyri HF.

1. febr. - 15. apríl: Tilmelding til HF.

24. apríl: HF-fundur um upptøku av nyggjum næmingum.

23. mai: Val av valgreinum.

Seinast eina tøkk til tey fólkini, ið hava latið tilfar og myndir. Eina serliga tøkk til Uffe Danvig, sum hevur lænt okkum myndirnar frá VBV.



MYNDIN Á PERMUNI:

SKÚVOYARSTEINURIN Á FORNGRIPASAVNINUM Í HAVN VIÐ SÓL-KROSSINUM, SUM MERKIÐ Í TÍ FØROYSKU STUDENTAHÚGVUNI ER MYNDAÐ EFTIR